| **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 309 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. april 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 87/23 – 116/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Maria Thorsteinsson

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 87/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 312 |
| 88/23 | 23/01579-1 | Matr.nr. 53 og matr.nr. 56, Tórshavn. Reynsgøta 7. Eigari søkir um, at Tórshavnar kommuna, fráfellur sín tinglýsta forkeypsrætt í hesum føri. | 314 |
| 89/23 | 23/01868-4 | Matr.nr. 255ee, Kirkjubøur,Argir. Eigarar ynskja at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa. | 316 |
| 90/23 | 23/02012-4 | Matr.nr. 255dt, Kirkjubøur,Argir. Eigarar lata grundstykkið innaftur til Tórshavnar kommunu. | 318 |
| 91/23 | 23/02068-3 | Matr.nr. 255dq, Kirkjubøur,Argir. Eigarar vilja lata grundstykkið innaftur til kommununa. | 320 |
| 92/23 | 23/01884-1 | Hestur sum valstað | 322 |
| 93/23 | 22/01898-1 | Keyp av traðum til framtíðar útstykkingar | 325 |
| 94/23 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 328 |
| 95/23 | 21/03047-1 | Tórsvøllur Torg | 339 |
| 96/23 | 22/05694-1 | Íbúðarbygging undir Fjalli matr. nr 1108 og 1107, Tórshavn | 346 |
| 97/23 | 15/04352-4 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin | 350 |
| 98/23 | 22/00107-1 | Árligt viðlíkahald á kommunalu brennistøðini | 358 |
| 99/23 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 364 |
| 100/23 | 18/00853-3 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sjósavnið á Argjum, matr. nr. 56as, Argir | 376 |
| 101/23 | 22/00463-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð | 378 |
| 102/23 | 23/01529-2 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 56as, Argir í smb. við ætlanir um sjósavn. Frá D1 til D3 | 385 |
| 103/23 | 23/01978-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 320a, Kollafjørður. Frá B1 til D1 | 388 |
| 104/23 | 14/00163-85 | Vatnbyrging í Kollafirði - 2001-2548 | 390 |
| 105/23 | 14/00800-3 | Fíggjartørvur til vegir og rundkoyringar til Brúnna við Sandá | 393 |
| 106/23 | 14/02182-8 | Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060) | 395 |
| 107/23 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 400 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 108/23 | 20/01731-2 | Broytan av svingi í Blómubrekku | 416 |
| 109/23 | 20/02256-1 | Vegur til biogassverkið | 419 |
| 110/23 | 20/03740-16 | Baraldsgøta 2 - grót rapar | 422 |
| 111/23 | 22/04229-3 | Áheitan um fund um parkeringsviðurskiftini við Nazaret í Kaldbak | 425 |
| 112/23 | 23/01650-2 | Tórshavnar havn - Reglugerð fyri gestapláss í Vágsbotni | 428 |
| 113/23 | 23/01670-2 | Tórshavnar havn : Broyting í reglugerð fyri bátapláss á landi | 430 |
| 114/23 | 23/01820-1 | Broyting í reglugerðini um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu | 432 |
| 115/23 | 23/01899-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2022 | 434 |
| 116/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 436 |

**Til viðgerðar**

# 87/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 87/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 88/23 Matr.nr. 53 og matr.nr. 56, Tórshavn. Reynsgøta 7. Eigari søkir um, at Tórshavnar kommuna, fráfellur sín tinglýsta forkeypsrætt í hesum føri.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 117/23 | 23/01579-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 88/23 | 23/01579-1 |

**Upprunin til málið.** Teldupostur frá advokati eigarans.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 56, Tórshavn. ( Reynsgøta 7, Tórshavn ) Vídd 251m². Við ástandandi sethúsum.
Matr.nr. 53, Tórshavn. Vídd 6m². við ástandandi hjalli.

Treytað søluskeytið fyriliggur, har Sp/F 21.12.2007, selur sín helming av omanfyri nevndu ognum, til eigara smápartafelagsins.

Sambært serstakari byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna, framgongur undir yvirskriftini. Trygging av endurnýggjanini. Punkt. 2.
Tá ið ein ogn innan deildarøki A, kemur til sølu hevur kommunan fyrsta keypsrætt. Ynskir kommunan at keypa, og verður ikki semja um prísin, verður prísurin settur av metingarnevnd landsstýrisins.
Deildarøki A, er sambært kortskjali sethúsaøkið og liggja matrikklarnir 53 og 56, báðir inni á deildarøki A.

Advokatur felagsins søkir um, at kommunan í hesum føri fráfellur forkeypsrættin, og loyvir víðarisølu sambært treytaðum skeyti. Sí skjal nr. 23/01579-3

**Lógir, ásetingar o.a.** Serstaka byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 315<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at góðkenna, at eigarans helmingur av matr.nr. 53 og matr.nr. 56, Tórshavn verður seldur, sí uppskot til skeyti, skjal nr. 23/01579-3 og at kommunan fráfellir sín fyrsta keypsrætt í hesum ítøkiliga føri.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 89/23 Matr.nr. 255ee, Kirkjubøur,Argir. Eigarar ynskja at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 116/23 | 23/01868-4 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 89/23 | 23/01868-4 |

**Upprunin til málið** Eigarar eru í holt við at keypa eini sethús og heita tí á kommununa um at keypa stykkið aftur.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 255ee, Kirkjubøur/Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 2 )

Vídd 407m2. Skeytið er tinglýst 15.01.2021. Keypsprísur 693.935,00 kr. men hava keyparar seinni fingið afturflutt fyri eina regulering í keypsprísinum kr. 61.457,00 soleiðis at endaligi netto keypsprísurin var kr. 632.478,00

Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Eigarar eru í holt við at keypa eini sethús og hava tískil ikki tørv á grundstykkinum longur.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskeytan, og rinda verandi eigarar tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 22/00185. Umsókn um byggiloyvi.
- 19/00016. Tillutan av grundstykkinum. Skeyti v.m.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kortskjal. 23/01868-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 317<br><br>Formansins merki: |

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla. |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 632.478,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan reguleraðan sølupris kr. 632.478,00 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 90/23 Matr.nr. 255dt, Kirkjubøur,Argir. Eigarar lata grundstykkið innaftur til Tórshavnar kommunu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 118/23 | 23/02012-4 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 90/23 | 23/02012-4 |

**Upprunin til málið.** Eigarar ynskja at lata stykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 255dt, Kirkjubøur/Argir. ( Útstykking Klingurstjørn 2 )

Vídd 400m2. Skeytið er tinglýst 04.02.2022 Keypsprísur 621.600 kr

Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Eigarar keypa sethús og hava tískil ikki tørv á grundstykkinum longur.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskeytan, og rinda verandi eigarar tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/03790. Byggiloyvi.
21/04000. Tillutan av grundstykkinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**. 23/02012-5. Korstkjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Býráðsfundur<br>27. april 2023 | Blað nr.: 319<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 2175 | | Keyp og søla |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 621.600,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan søluprís kr. 621.600,00 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 91/23 Matr.nr. 255dq, Kirkjubøur,Argir. Eigarar vilja lata grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 119/23 | 23/02068-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 91/23 | 23/02068-3 |

**Upprunin til málið.** Eigarar hava keypt sethús, og ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Vídd 400m2. Skeytið er tinglýst 08.09.2022 . Keypsprísur 621.600,- kr.

Grundstykkið er grovplanerað og við øllum kommunalum tekniskum veitingum.

Eigarar hava keypt sethús og hava tískil ikki tørv á grundstykkinum longur.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskeytan, og rinda verandi eigarar tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin.
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

| **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 321<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 621.600,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri søluprís kr. 621.600,00 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

## 92/23 Hestur sum valstað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 115/23 | 23/01884-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 92/23 | 23/01884-1 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá fyrisitingini til staðbundnu nevndina fyri Hest 22. mars 2023.

**Lýsing av málinum**
Hestur er í dag valstað. Veljarar í Hesti og Koltri velja í Hesti. Til løgtingsvalið í 2022 høvdu 17 veljarar valrætt og 15 atkvøðu.

Til fundin í staðbundnu nevndini fyri Hest tann 22. mars 2023 heitti fyrisitingin á nevndina at umrøða hvørja støðu nevndin hevur til Hestur sum valstað.

Í málslýsingini verður víst á: Her verður hugsað um, um veljarar í Hesti velja loyniligt. Í mun til vegleiðingina hjá landinum er ikki nakar trupulleiki; har verður sagt, at minsta talið av veljarum er 10.

Ein annar møguleiki er at heita á landsstýrið um at niðurleggja Hest sum valstað og leggja saman við valstaðnum á Hálsi. Tey, sum ynskja, kunnu so velja á Hálsi.

Kommunan bindir seg til at koma út í Hest 1-2 ferðir frammanundan valinum og bjóða veljarum í Hesti at brævatkvøða.

Niðurstøðan frá nevndini var, at nevndin tekur undir við at brævatkvøtt verður í Hesti og kommunan bindir seg til at fara út í Hest tvær ferðir til brævatkvøðu.

Koltur er eisini partur av valstaðnum Hestur, men hava tey valt at brævatkvøða í Havn; tað er lættari enn at sigla út í Hest. Í løtuni er eingin skrásettur at búgva í Koltri.

Annars eru í Tórshavnar kommunu 7 valstøð (valið 8. Desember 2022):
Tórshavn við 13482
Argir við 1767 veljarum
Kollafjørður við 741 veljarum
Velbastaður við 240 veljarum
Nólsoy við 180 veljarum
Kaldbak við 176 veljarum
Hestur við 17 veljarum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 49 frá 20. Juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. September 2020.

**VIII. Valstøð, valstýrir, valhøli v.m.**

**§ 20.** [3)] Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.

*Stk. 2.* [8)] [3)] Atkvøðugreiðsla fer fram í einum ella fleiri hølum, sum kommunustýrið ávísir, har atkvøðurúm í neyðugum tali eru sett upp. Atkvøðurúmini skulu vera soleiðis háttað, at ongin hevur møguleika fyri uttanífrá at síggja, hvussu avvarðandi hevur atkvøtt. Atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða.
*Stk. 3.* [3)] Kommunustýrið útvegar ein ella fleiri atkvøðukassar, ið skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram, og annars soleiðis háttaðir, at ongin atkvøðuseðil kann verða tikin upp úr, uttan kassin verður latin upp.
*Stk. 4.* [3)] Í atkvøðuhølunum skulu yvirlit yvir valevnislistarnar vera uppsligin. Somuleiðis skal vera uppsligin ein vegleiðing fyri veljararnar, sum skal innihalda tær greinir í hesi lóg, sum mest týdning hava fyri sjálvt valið.

**§ 21.** [3)] Val fer fram á teimum valstøðum, sum tilskilað eru á viðhefta skjali til hesa lóg. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð broyta valstøðini. Onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Hoyvík sum valstað j.nr. 23/00223. Býráðið samtykti á fundi 26. januar 2023 at heita á Løgmálaráðið at stovnseta Hoyvík sum valstað. Skriv varð sent til Løgmálaráðið 2. februar 2023.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Sí málslýsing um fund í staðbundnu nevndini fyri Hest og Koltur 22. mars 2023.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **ja** | **ja** | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum umvegis fíggjarnevndina at heita á Løgmálaráðið um at niðurleggja Hestur og Koltur sum valstað og at veljarar í Hesti og Koltri velja í Tórshavn.
Samstundis bindir kommunan seg til at fara út í Hest 2 ferðir undan hvørjum vali og geva veljarum møguleika fyri at brævatkvøða.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 93/23 Keyp av traðum til framtíðar útstykkingar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 126/22 | 22/01898-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 165/22 | 22/01898-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 156/22 | 22/01898-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 120/23 | 22/01898-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 93/23 | 22/01898-1 |

**Upprunin til málið**
Í Kommunuætlanini og í bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu verður mælt til, at fleiri bústaðir verða gjørdir í kommununi.

Tórshavnar kommuna hevur herfyri boðið tveir kommunalar matriklar við Villingadalsvegin út í alment útboð við tí treyt at tað verða bygdar lutaíbúðir. Kommunan kann gera sítt fyri at stýra planeggingini ávísar vegir við at útleggja lendir til ávís endamál, t.d. til bústaðarbygging. Nógvir óbygdir matriklar eru í júst hesum økinum og kundu við fyrimuni inngingið sum ein partur av einum framtíðar bústaðarøki við Villingadalsvegin, sí *Kortskjal 1 - uppskot til keyp av lendi.* Allir matriklarnir eru tó ikki ogn hjá Tórshavnar kommunu og um hetta skal gerast til veruleika, skal eitt samskifti og ein tilgongd um keyp av lendi setast í verk.

**Lýsing av málinum**
Talan er um matr. 1357b (Eystara Húsagarðsfesti), 1235a (privatur eigari) 1378 (privatur eigari), 1377a (Eystara Húsagarðsfesti).

Matrikul 1374, har inntakið til tunnilsmunnan til innkomuvegin verður, er sambært avtaluni um stuðul frá landinum til innkomuvegin handaður Tórshavnar kommunu.

Lendið fram við Villingadalsvegnum er í stórari menning, við nógvum bústøðum í gerð.
Serliga eru tað stór sethús við egnum urtagarði, ið seta sín dám á verandi bygda øki. Eisini eru nøkur tvíhús í økinum, men staðfestast kann, at størsti parturin av samlaðu bústøðunum eru eigarabústaðir. Um kommunan keypir nevndu matriklar, er møguleiki fyri at útbyggja hesi til eina fjølbroytta bústaðarsamanseting, soleiðis at ein breiðari borgaraskarði kann búseta seg her.

Økið liggur í umráðisparti A3, ið loyvir bygging av blandaðum bústaðarsløgum. Hendan áseting loyvir sethúsa, raðhúsa-, tvíshúsa- og íbúðarbygging umframt loyvi til at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Talan verður um heilt nýggjar býlingar, ið koma at liggja fyri endan á Villingadalsvegnum, har møguleikin fyri at gera økið við blandaðum bústaðar- og mistaðarfunktiónum verður til staðar.

Óbygdu matriklarnir liggja fyri endan av Villingadalsvegnum. Í verandi løtu er ein grúsvegur inn til økið, sum ikki er ein góðkendur atkomuvegur, umframt hetta skulu tekniskar leiðingar leggjast inn til matriklarnar og eftirkannast um verandi reinsiverk klárar at móttaka ein heilt nýggjan býling. Hetta er ábyrgd hjá Tórshavnar kommunu. Vanligt hevur verið, at verkætlanir fíggja hesar útreiðslur. Lutaíbúðarverkætlanin kemur væntandi at fíggja ein part av atkomuvegnum og teknisku leiðingum, og vildi tað við fyrimuni verið skynsamt at býtt hesar útreiðslur millum fleiri verkætlanir í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild upplýsir, at góðkend vegatkoma skal gerast til stykkini umframt at verandi kloakk skal eftirkannast, tí hon er ikki dimensjonerað til at móttaka nógv meiri enn tað hon ger í dag. Tó kann hugsast, at leiðingarnar frá nýggju býlingunum kunnu býtast millum verandi leiðingar í økinum, og at reinsiverkið kann útskiftast til eitt størri.

**Skjøl**
Kortskjal 1 - uppskot til keyp av lendi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og eina tilgongd við eigarar av matr. 1357b, 1235a, 1378, 1377a um keyp av lendi
- at heimila umsitingini at fara undir kanningararbeiðið av vegatkomu og tekniskum leiðingum í økinum í mun til broytingar og kostnað
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at hon heldur, at umhvørvisáringskanningar eiga at verða gjørdar av lendinum, áðrenn avgerð verður tikin um at fara undir eina keypstilgongd.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

**Viðvíkjandi matr.nr. 1235a og 1378.** Vídd.tls. 12.016$m^2$
byggisamtykt A3. Privatogn.

Umsitingin hevur tosað við eigararnar, sum greiða frá, at tey hava ongar ætlanir um at selja.
Tey vilja tó møguliga selja til marknaðarvirði, um so er at kommunan kemur við einum nøktandi tilboði.
Eigari av matr.nr. 1378 umhugsar at stykkja økið út til sethúsagrundstykkir.

<u>Virðismeting av grannaognum.</u>
Grannaognirnar matr.nr. 1355 og 1356, eru í januar 2022 virðismettar av Skyn til
912 kr./$m^2$ (A3 í byggisamtykt).

**Viðvíkjandi matr.nr. 1377a og 1357b.** Vídd tls. 19.763$m^2$

Byggisamtykt: A3.
Eigari: Búnaðarstovan.

Búnaðarstovan hevur hin 24. mars 2023, givið kommununi eina fyribils tilsøgn um keyp av lendinum við treytum um, at lendið verður selt til blandaða íbúðarbygging, og at øll nýtsla og alt virksemi skal hava heimild sambært byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og aðrari viðkomandi lóggávu.

Søluprísurin íroknað mettar frábýtingarútreiðslur, tinglýsingargjald og sakargjald er
**kr. 1.828.880,00**

**Tilmæli:**

**Viðv. matr.nr. 1235a og 1378, Tórshavn.**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla frá at keypa ognirnar vísandi til, at hesar eru lutfalsliga nógv dýrari, enn búnaðarjørð verður keypt fyri.

**Viðv. matr.nr. 1377a og 1357b, Tórshavn.**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis figgjarnevndina at keypa ognirnar matr.nr. 1377a, og 1357b, Tórshavn, frá Búnaðarstovuni, sí fyribils tilsøgn pr. 24.03.2023 fyri **kr. 1.828.880,00**

Vísandi til at talan er um eina fyribils tilsøgn, verður mælt til at hava játtan tøka upp til 1.900.000,00 kr.

Mælt verður til at játta kr. 1.900.000 av konto 6175, Keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 94/23 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |
| 22 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 107/19 | 16/01715-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 119/19 | 16/01715-2 |
| 24 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 93/19 | 16/01715-2 |
| 25 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 127/19 | 16/01715-2 |
| 26 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 216/20 | 16/01715-2 |
| 27 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 200/20 | 16/01715-2 |
| 28 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 167/20 | 16/01715-2 |
| 29 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 242/20 | 16/01715-2 |
| 30 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 193/20 | 16/01715-2 |
| 31 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 34/21 | 16/01715-2 |
| 32 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 52/21 | 16/01715-2 |
| 33 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2021 | 56/21 | 16/01715-2 |
| 34 Mentamálanevndin | 24.03.2021 | 68/21 | 16/01715-2 |
| 35 Fíggjarnevndin | 25.03.2021 | 72/21 | 16/01715-2 |
| 36 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 106/21 | 16/01715-2 |
| 37 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 49/23 | 16/01715-2 |
| 38 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 16/01715-2 |
| 39 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 68/23 | 16/01715-2 |
| 40 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 70/23 | 16/01715-2 |
| 41 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 94/23 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**
Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali, sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi. Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum
Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir byggingina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamála-nevndini til at taka undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í næstum skal Tórshavnar kommuna, samsvarandi samtyktini í málinum, at skriva undir treytað skeytið um keyp av ÍSF-húsinum, við yvirtøku á sumri 2020. Mett verður hóskandi at játta fíggingini til keypið á 5.000 tkr., umframt tinglýsingargjald á 1% av keypsupphæddini, í inniverandi ári.

Samráðingar fara í næstum í gongd við ÍSF um endaligan leigusáttmála um lendið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 5.050 tkr. av tøkum peningini. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at veita ÍSF stuðul við tí endamáli at taka húsið niður.

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Imóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Í fjør samtykti býráðið treytað skeyti og ætlanarskriv við ÍSF. ÍSF er ikki komið á mál við innanhýsis tilgongdini hvørt felagsskapurin byggir nýtt høvuðssæti við Ovara vøll í Gundadali.

Fyri at tryggja at ætlanin um bygging av langhyli kann byrja og fyri at ÍSF kann fáa eitt sindur longri skotbráð til at avgera spurningin um nýtt høvuðssæti, var í juli 2020 var fundur millum ÍSF og TK í sambandi við málið um staðseting av nýggjum ÍSF-húsi.

ÍSF er ikki enn komið á mál við tilgongdini um nýtt ÍSF-hús. Av tí at tað ikki er endaligt, um ÍSF vil byggja við Ovara vøll ynskir felagsskapurin at kunna kapitaliserað tað virði, sum annars lág í virðinum í ætlaðu staðsetingini (byggibúning og sambygging). Hetta var í 2019 mett til 3,55 mio.kr. ÍSF hevur tí ynski um at leingja skotbráðið til at fara undir bygging eitt ár afturat í mun til áður ásetta dato í 2024. T.v.s. at ÍSF skal hava gjørt galdandi hetta endurgjaldið innan 31. desember 2025, tá tað eisini verður evsta freist fyri at felagsskapurin er farin undir at byggja við Ovara vøll.

Sí hjálagt
a). Dagført skeyti
b). Dagført ætlanarskriv
c). Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti

Stjórn í ÍSF hevur principielt tikið undir við hesum skjølunum, men skal sbrt. lógunum hjá felagsskapinum leggja tað fyri á eykaaðalfundi til góðkenningar og verður tað ætlandi um umleið 3 vikur.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at innganga hjálagda skeyti, ætlanarskriv og sáttmála. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
ÍSF hevði eykaaðalfund 16. september 2020 til at taka støðu til endaligu skjølini.

Eykaaðalfundurin ynskti og samtykti eina minni broyting í skjalinum 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti'.

Talan er um umorðingar, sum innibera, at í tann mun, at ÍSF ikki ger álvara av at byggja við Ovara vøll í Gundadali, so skal TK bjóða ÍSF eitt annað hóskandi byggibúgvið grundstykki. Meðan orðingarnar frammanundan ikki innibóru eina skyldu til at royna tað, men at TK kundi velja at gera tað.

Hinvegin so stendur óbroytt við, at um partarnir ikki semjast um tann møguleikan, so fær ÍSF endurgjald á 3,55 mio.kr. fyri útreiðslur, ið TK annars ætlandi hevði havt av byggibúning av øki sunnanfyri og vestanfyri skýlið við Ovara vøll í Gundadali, umframt sambygging við sjálvt skýlið. ÍSF kann gera hetta endurgjald galdandi frá 1. januar 2021 og inntil 31. desember 2025.

Umsitingin metir at henda broytingin ikki broytir grundleggjandi uppá tað, sum er ætlanin yvirfyri ÍSF og tí kann gerast.

Fyri at tað skal vera samsvar millum samtyktina hjá ÍSF og hana hjá kommununi er neyðugt at staðfesta broytingina. Sí hjálagt dagført skjal 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1'. Hini bæði skjølini (skeyti og ætlanarskriv), ið vóru samtykt á seinasta fundi, standa við óbroytt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja dagførda skjalið 'Sáttmáli um framtíðar ÍSF-høvuðssæti 18.09.2020_1’. Málið verður beint býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi 21. januar 2021 heitir ÍSF á kommununa um at fara undir tilgongd, har nýtt høvuðssæti til ÍSF verður bygt oman á FIMI í Gundadali. ÍSF vísir á, at nú ÍSF húsast i fyribilshølum, er tørvur á at fáa gongd á endaliga hølisloysn skjótast gjørligt bæði til virksemið hjá ÍSF og sersmbondum í ÍSF.

Kommunan og ÍSF hava í fleiri umførum samskift um nýtt høvuðssæti til ÍSF. Í hesum sambandi eru tvey ætlanarskriv gjørd, har tað í 2016 varð undirskrivað ætlanarskriv um høvuðssæti oman á Fimi, og í oktober 2020 varð undirskrivað ætlanarskriv um høvuðssæti við skýlið á Ovara vølli í Gundadali.

Ynskið er sostatt at venda aftur til upprunaligu ætlanina. FIMI er ítróttabygningur, sum mentamálanevndin varðar av.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera áheitanina frá ÍSF, og beina málið um staðseting av nýggjum ÍSF høvuðssæti oman á FIMI í byggi- og býraskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við staðseting oman á Fimi og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt og mælir til at hoyra Havnar Fimleikarfelag og Fimleikafelagið Ljósið.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir at fáa málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt hoyra virkandi feløg og at leggja málið fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Ískoyti og tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
15. mars 2021 var fundur við umboð fyri virkandi fimleikafeløgini í Fimi, Havnar Fimleikafelag og Ljósið. Umboðini vístu á stóra tørvin á fleiri og betri umstøðum at venja fimleik í, serliga vísti umboðini fyri Ljósið á vánaligu umstøðurnar, sum fimleikafelagið hevur í fimleikahøllini í Sankta Frans skúla, og umboðið fyri Havnar Fimleikafelag vísti á, at teirra úrvalsfimleikarar mugu til Runavíkar og Klaksvíkar at venja, tí tey mangla tímar í Fimi. Nógv íðka fimleik, og tað er av stórum týdningi, at fimleikurin verður hugsaður inn í verandi hølir í kommununi, og í komandi út-/nýbyggingar.
Somuleiðis vístu umboðini á, at tað sera óheppið, um møguleikin at vaksa um fimleikavirksemið í Gundadali verður steðgað, grundað á, at bygt verður til okkurt annað virksemið omaná Fimi. Borgarstjórin lovaði, at feløgini vera kallaði innaftur, tá tekningar fyriliggja viðv. bygging av ÍSF omaná FIMI.

Fyri kommununa er málið viðv. ÍSF somuleiðis týðandi at fáa loyst, tí felagsskapurin er undir stórum trýsti og er staðsetingin av nýggja bygninginum týðandi fyri at felagsskapurin hevur nakað ítøkiligt at arbeiða fram ímóti.

Í sambandi við um verandi bygging (Fimi) tolir at verða bygt omaná, so gjørdu MT Højgaard útrokningar hesum viðvíkjandi í 2008, sí viðhefta skjal 16/01715-90 Utrokningargrundarlag, sum somuleiðis er at finna í j. nr. 2008-4245/118.
Útrokningarnar vísa, at tað er møguligt at byggja tvær hæddir oman á verandi bygging. Hesar hæddir skulu gerast sum lættar konstruktiónir.

Gundadalur er í dag rættiliga tætt bygt, og verður mett, at virksemið hjá ÍSF væl kann verða staðsett aðrastaðni enn oman á Fimi. Fimi húsar fimleikinum, og um fimleikurin skal víðkast í økinum, so er upplagt at tað verður gjørt við, at byggja omaná Fimi. Um møguleikin at víðka um virksemið verður steðgaður við at byggja ÍSF oman á Fimi, so verður mett, at fimleikurin eigur at verða hugsaður inn í framtíðar verkætlanir innan ítróttin.
Tað er skilligt, at ÍSF ynskir at verða staðsett í Gundadali, tí stórur partur av ítróttarvirkseminum í kommununi er her, og sostatt vil virksemið, sum felagsskapurin umboðar síggjast aftur í uttanumhvørvinum. Spurningurin er bara, um felagsskapurin sær møguleikar í at verða staðsett aðrastaðni í Gundadals-økinum, her verður t.d. hugsað um møguleikan at byggja hølir til ÍSF kring Tórsbreyt, um breytin verður víðkað við einum bygningi, ella um ein bygging verður bygd omaná parkeringsøkið út móti R.C. Effersøes gøtu. Hesar nevndu staðsetingarnar eru ikki neyvt kannaðar, men býarskipanarliga verður mett, at hesar staðsetingarnar yvirskipað eru betri egnaðar til virksemið í mun til at “kroysta” virksemið inn í Gundadalsøkið, umframt at møguleikin at víðka um fimleikavirksemið tá ikki verður steðgaður.

Av tí at málið er átrokandi at fáa loyst, og aðrar staðsetingar enn omaná Fimi ikki hava verið umrøddar við ÍSF, umframt at teirra ynski hevur verið at verða staðsett oman á Fimi, so verður mett ráðiligt, at mæla til

at staðseta ÍSF oman á Fimi. Tó hevði verið ynskiligt, um aðrar staðsetingar somuleiðis vórðu umrøddar við ÍSF.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta ÍSF omaná Fimi, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar og í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annnfinn Brekkstein og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam og Ruth Vang, tekur ikki undir við tilmælinum á verandi grundarlagi vísandi til at aðrir møguleikar fyri staðseting í Gundadali eiga at verða kannaðir.

**Mentamálanevndin 24. mars 2021:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. mars 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini at kanna aðrar staðsetingar í Gundadali, ið fall við fýra atkvøðum fyri, sjey ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Blankt atkvøddi: Jákup Dam.

**Ískoyti:**
ÍSF hevur sett í gongd arbeiði at fáa til vega skipanaruppskot fyri ÍSF-húsinum. ÍSF hevur í hesum sambandi gjørt uppskot, har ÍSF-húsið er staðsett á allari víddini á Fimi-bygninginum, hetta samsvarandi ætlanini.

FSF hevur í hesum sambandi gjørt vart við, at UEFA í sambandi við góðkenningar av Tórsvølli sum altjóða stadion hevur ynski um, at útivallaráskoðarar til altjóða landsdyst eru á øki fyri seg, ið eisini er tað vanliga aðrastaðni. Metingin hjá UEFA er, at tað á Tórsvølli hóskar seg best at skipa øki til útiáskoðarar við norðurendan og harvið omaná parti av Fimi.

ÍSF, FSF og kommunan hava síðani umrøtt, hvørjar tillagingar kunnu gerast í skipanaruppksotinum, sum taka hædd fyri bæði tørvi og ynskjum hjá ÍSF viðvíkjandi ÍSF-húsinum og FSF saman við kommmuni viðvíkjandi Tórsvølli sum altjóða góðkent stadion.

At gera broytingar í skipanaruppskotinum fer at kosta kr. 340.000. Vísandi til, at tað eru atlitini til Tórsvøll, sum gera tað neyðugt hjá ÍSF at broyta skipanaruppskotið, er FSF saman við kommununi sinnað at gjalda hetta, har FSF og kommunan rinda hvør sína helvt, t.e. kr. 170.000.

Skotið verður upp at figgja hetta av løgukontu 6175 L61026 ÍSF-húsið kr. 50.000 og løgukontu 5275 LK 52002 Kvøldskúlin kr. 120.000, og at flyta samlaðu upphæddina kr. 170.000 til kontu 5717 Ítróttaanlegg.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 50.000 av løgukontu 6175 L61026 ÍSF-húsið og kr. 120.000 av løgukontu 5275 LK 52002 Kvøldskúlin til endamálið og at flyta samlaðu upphæddina til kontu 5717 Ítróttaanlegg. Málið at beina í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Annika Olsen og Elsa Berg taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

## 95/23 Tórsvøllur Torg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 335/20 | 21/03047-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 335/20 | 21/03047-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 249/20 | 21/03047-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 308/20 | 21/03047-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 66/21 | 21/03047-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 27/21 | 21/03047-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 94/21 | 21/03047-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 88/21 | 21/03047-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 119/21 | 21/03047-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 20/23 | 21/03047-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 48/23 | 21/03047-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 73/23 | 21/03047-1 |
| 13 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 75/23 | 21/03047-1 |
| 14 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 95/23 | 21/03047-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórsvøllur sum altjóða stadion.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2010 settu Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya seg fyri at fáa Tórsvøll góðkendan sum altjóða leikvøll. Verkætlanarstigini hesi ár hava verið:

- Masterplan fyri Tórsvøll 2010-2011
- Ljósanlegg sett upp 2011
- Grasvøllur skiftur við graslíkisvøll 2012
- Suðurtribuna tikin niður, nýtt FSF høvuðssæti og áskoðarapláss undir tak, eysturskýli undir tak 2013-15
- Vesturskýli við umklæðingarrúmum, teknisku hølum, áskoðarapláss undir tak v.m. 2016-21

Síðsta verkætlanarstigið í teirri ætlan, sum løgd varð upprunaliga, og sum eisini er partur av kravdum umstøðum til altjóða stadion, er torgið uttanfyri sjálvt stadion. Talan er um alt økið frammanfyri FSF høvuðssætið og Niðara vølli frá økinum millum Dansifrøi og Gundadalshøllina og framvið Gundadalsvegnum til og við Brigdehúsið.

Torgið fevnir um røð av funktionalitetum, sum hava við altjóða dystarstøðu at gera. Torgið skal harumframt liva upp til býarskipanarlig krøv samsvarandi heildarætlanini fyri Gundadal, har hetta økið er høvuðsportalur til Gundadal frá miðbýnum.
Yvirskipað er torgið skipað sum eitt uppihaldstorg við spæliplássi til allar aldursbólkar umframt parkering, vegir og gøtur. Tá landsdystir eru, verður torgið umskipað, so tað kann møta øllum krøvum, sum UEFA setur til kategori 4 stadion.

Torgið fevnir um:
- Skipað atkomu til áskoðarar, liðbussar, catering, neyðsendarakfør v.m.
- 1.000 m2 P-øki til sjónvarpsvognar, sum ásett fyri kategori 4 stadion, men sum í dagligdegnum antin kann brúkast til “street ítrótt” , ella parkering (33 stk.), tá dystir eru í Gundadali
- Farleið hjá gongufólki og súkklandi gjøgnum Gundadal sum lýst í “Heildarætlanini fyri Gundadal”

- Uppihaldstrappa frammanfyri FSF høvuðssætinum og Kafé #12
- Nýtt urbant spælipláss til allar aldursbólkar
- P-øki við Gundadalshøllina til 72 bilar
- Planting fram við Gundadalsvegnum og á torginum
- Allur belegningur á økinum (asfalt, betong og flísar)
- Innbygt “uttara hegn” og “turnstiles”[1]
- Info- og atgongumerkja kiosk
- Goymsla til “turnstiles”[1]
- Ljósseting sum lýst í  “Heildarætlanini fyri Gundadal”
- Av- og áseting til torgið
- Busslummar til býbussar
- Benkur og annað býarinventar
- Spæliplássútgerð

1) “Turnstiles” er teljingartól til áskoðarar

Barakkirnar framvið Gundadalsvegnum, sum eru fýra samanbygdar bygningar, skulu takast niður. Kommunan eigur tveir av bygningunum, hinir standa á leigaðum lendi hjá kommununi. Tilgongd at yvirtaka báðar bygningarnar, sum ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgini eiga, er í gongd.

Harumframt verður Gundadalshøllin eftir ætlan yvirtikin, har kommunan eftir hetta hevur fult ræðið á økinum millum Gundadalshøllina og Dansifrøi, sum ætlað er til P-øki.

Arbeiðið verður eftir ætlan gjørt í stigum, so hvørt økið verður tøkt. Fyrsta stig er at byggja saman stadion og torg við uppihaldstrappuni og farleið frá Gundadalsvegnum til stadion. Trappan er eisini liður í at javna hæddarmun.

Ætlanin er at skipa verkætlanina sum samstarv millum kommununa og FSF eftir sama leisti sum undanfarnu byggistig. Uppskot til samstarvsavtalu er gjørt. Sambært uppskotinum hevur samlaða verkætlanin eitt útreiðslukarm uppá kr. 30 mió, og at kommunan rindar 65% og FSF 35%. Arbeiðið er sett at byrja í 2021 og enda í 2023.

Í samstarvsavtaluni er eisini ásett, at niðurtøka av barakkunum er partur av verkætlanarkostnaðinum, men at kommunan serskilt ber kostnaðin at yvirtaka ognirnar hjá ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgunum.

Í íløguætlanini eru kr. 5 mió settar av til endamálið 2021. Íløgujáttan fyri alla byggingina verður at játta árini 2022 og 2023.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Samráðing um yvirtøku av bygningum er í sjálvstøðugum málum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um íløguverkætlan í samstarvi millum kommununa og FSF eisini um fíggjarliga kostnaðin. Loft er lagt á kostnaðin. Umsitingin og FSF eru í gongd við at skipa felags avtalu um rakstur og viðlíkahald av øllum Tórsvølli, harímillum eisini torginum.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 19.500.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021-2023 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk | 5775 | Nýggj projektkonta | | 5775 | L00001 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió av løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L0001 løgukarmur í 2021 til nýggja projektkontu Tórsvøllur torg. Harumframt verður mælt til at játta kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2022 og kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2023.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Ískoyti:**
Talan er um verkætlan skipað sum eitt samstarv millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu, og skal uttanum økið til stadion til tíðir fevna um dystarstøður, men meginpartin av árinum er talan um alment øki, sum skal virka í gerandisdegnum.

Økið er áleið 7000-8000 $m^2$ til støddar, og eru greið altjóða krøv til dystarstøður, sum skulu samantvinnast við býarskipanarlig viðurskifti. Skitsuuppskotið tekur atlit til altjóða krøvini, og eru býarskipanarligu viðurskiftini partvís lýst í uppskotinum og í skjalinum *Viðmerkingar til spælipláss.*

Ein tørvslýsing hevði verið fyrsta stigið í eini skilagóðari tilgongd, har umsitingin beinanvegin varð tikin við uppá ráð. Vantandi tørvslýsingin hevði verið við til at tryggja ein samanhang millum tørv, krøv og ynskir til nýggja økið, umframt at verkætlanin varð sett inn í eina yvirskipaða hugsan í tráð við heildarætlanina fyri Gundadal og ítøkiligu verkætlanina um vestara skýlið á Tórsvølli.

Talan er um eitt stórt býartorg í Havnini, og tí er hóskandi at vera framsíggin í mun til, hvørji ynskir og krøv verða sett til verkætlanina. Verkætlanin verður mett at kosta 19 mió. kr., sum er eitt boð frá ráðgeva. Upphæddin er ikki grundað á eina kostnaðarmeting við støði í eini tørvslýsing, tí taka nógv ivamál seg upp í mun til verkætlanina. Mælt verður tí til at arbeiða víðari við at nágreinað verkætlanina við eini tørvslýsing í eini neyðugari tilgongd, sum skal vera grundarlagið undir verkætlanini. Hetta seinasta kundi verið skilmarkað í samstarvsavtaluna undir *Útinnan av arbeiðinum grein 4,* har tað stendur: *"...byggingin av torgi v.m. verður bygt eftir prosjekti, uppsett av MAP arkitektum"*.

**Skjøl:**
*Viðmerkingar til spælipláss*, journal nr. 20/04581-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya treytað av, at verkætlanin verður nágreinað í neyðugari tilgongd og ráðgevarasáttmáli verður gjørdur við ráðgeva og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Borgi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Byggiskrá er evnað til verkætlanina at skipa nýtt býartorg í Gundadali. Byggiskráin er býtt í seks partar við yvirskriftunum:

- 1.0 Inngangur
- 2.0 Fortreytir
- 3.0 Krøv og ynski til byggimálið
- 4.0 Krøv og ynski til býarbúnaðin
- 5.0 Tøkni og veitingar
- 6.0 Skipan av verkætlan

Ynskið er at skapa eitt ítrótta- og trivnaðarpláss í Gundadali, sum bæði lýkur altjóða krøv til virksemið hjá Fótbóltssambandi Føroya (FSF), eins og økið gerst eitt virkið býarrúm. Pláss skal vera til spæl og uppihald,

ið vendir sær til øll uttan mun til aldur ella tilknýti til eitt av mongu ítróttafeløgunum í økinum. Yvirskipað verður býartorgið býtt í 6 høvuðsfunktiónir, og skal býartorgið rúma:

- einum túni til eina størri fólkamongd, umleið 1500-2000 fólk.
- einum 1000 m$^2$ stórum parkeringsøki til sjónvarpsvognar.
- einari uppihaldstrappu.

einum spæliøki til allar aldursbólkar.

- einari min. 500 m$^2$ stórari skoytubreyt.
- 150 parkeringsplássum til VIP og vitjandi.

Byggiskráin leggur upp til, at uppgávan at skipa býartorgið í Gundadali fevnir um at finna fram til bestu loysnina at skipa nýtt býartorg á økinum, umframt at finna fram til bestu loysnina at sameina góða býarplanlegging og byggilist við altjóða krøv til virksemið hjá FSF, soleiðis at Tórsvøllur endaliga kann gerast tjóðarleikvøllur føroyinga. Talan er sostatt um eina skipan á økinum, sum leggur upp fyri verandi virksemi bæði byggilistarliga og byggitøkniliga, umframt at býartorgið hevur til endamáls at víðka karmarnar, sum lúka altjóða krøv og nútímans býarumstøður. Sí nágreinað krøv til býartorgið í byggiskránni.

**Skjøl:**
Byggiskráin Býartorgið í Gundadali, journal nr. 20/04581-11

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at samtykkja byggiskránna fyri verkætlanina at skipa nýtt býartorg í Gundadali, at heimila umsitingini at gera ráðgevarasáttmála við MAP Arkitektar og at beina málið í býráðið umvegis, teknisku nevnd, mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfnn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð av verkætlanini Tórsvøllur Torg hevur verkætlanin ligið still. Ynskiligt er, at verkætlanin verður tikin uppaftur, soleiðis at økið verður fríðkað og at umstøðurnar til Tórsvøll verða raðfestar.

Byggiskráin er skrivað og samtykt, og ynskiligt er nú at fáa gjørt eitt skipanaruppskot av økinum út frá byggiskránni. Og eftirfylgjandi, tá skipanin av økinum er liðug, so er ætlanin at fara undir at prosjektera, bjóða verkætlanina út og seta arbeiðið at fremja torgið í gongd.

Upprunaliga vórðu kr. 5 mió. játtaðar til L57035, Tórsvøllur Torg. Írestandi upphædd er áljóðandi kr. 3.591.000, sum er ynskilig at savna á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275.
Á íløgukarminum LK62055, Torg framman fyri FSF, eru settar av kr. 2 mió. til verkætlanina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57035 | Tórsvøllur Torg | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | x | 3.591.000 |
| 6275 | LK62055 | Torg frammanfyri FSF | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | x | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 5.591.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir skipan av økinum, prosjektering, útbjóðing av verkætlanini, og at seta arbeiðið í verk.
- at írestandi upphædd á kr. 3.591.000 á L57035, Tórsvøllur Torg, verður flutt á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275
- at játta kr. 2 mió. av LK62055, Torg frammanfyri FSF, á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið og samtykt omanfyri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við samtyktini í byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at írestandi upphæddin, ið skal flytast av konto 5775 L57035 yvir á nýggja projektkonto undir konto 6275 er kr. 2.975.688.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 96/23 Íbúðarbygging undir Fjalli matr. nr 1108 og 1107, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 209/22 | 22/05694-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 280/22 | 22/05694-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 264/22 | 22/05694-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.04.2023 | 50/23 | 22/05694-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 100/23 | 22/05694-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 96/23 | 22/05694-1 |

**Upprunin til málið**
Fólkavøksturin heldur á fram, og seinasta ári hevur fólkavøksturin í høvusstaðarøkinum verið 1,5%, ið svarar til 350 fleiri persónar. Nógv er bygt seinastu árini, men tað vísir seg ikki at nøkta tørvin, ið er. Býurin veksur, og byggilendini gerast færri í tali, tá hugsað verður um bygging innanfyri verandi bý. Enn eigur kommunan grundstykkir, sum í almennu byggisamtyktini eru løgd av til bústaðarbygging. Ein útbjóðing til bústaðarbygging á hesum matriklunum stuðlar undir visjónina í bústaðarpolitikkinum, at kommunan framhaldandi útvegar lendi til bústaðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða tríggjar matriklar út til bygging av íbúðum. Talan er um matr.nr. 1108,1107 og part av matr.nr. 1166c undir Fjalli, Tórshavn, *kortskjal*.

Ikki er tað nakað nýtt at byggja bústaðir í nevnda øki. Í 2018 gjørdu Ove Mortensen Arkitektavirkið og Arkitektar 99 uppskot til heildarætlan fyri økið, sí skjal *Presentatión 11-10-2018 TK.*

Endamálið við heildarætlanini var, at samskipa alt økið so, at skilagóður samanhangur verður millum ymisku økini, og samstundis gera eina yvirskipaða ætlan fyri skipan av økinum, í mun til ferðslu, vegir, grøn øki og slag av bygging.

Matriklarnir liggja í markinum millum tann bygda býin og hagan, og tískil sklu vegur og tekniskar leiðingar leggjast til stykkið. Matriklarnir liggja tó tætt við gerandishentleikar, so sum Glasir, Skúlan á Fløtum og Bónus, ið liggja undir 500 metrar frá økinum. Matriklarnir liggja í brattlendi, og byggingin í økinum skal sostætt leggja seg í lendið, á ein hátt, sum byggir uppundir og undirstrikar landslagið. Økið er upplagt til høga bygging og ynskiligt er, at Íbúðarhúsini skulu verða skiftandi í skurði, við høgari takreisn og vaksa í hædd upp móti fjallasíðuni.

Matriklarnir liggja í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í A2- øki, ið er lagt av til høga bústaðarbygging. Teir eru til víddar;

Matr. nr. 1107:13.414 m².
Matr. nr. 1108: 7.577 m².
Matr. nr. 1166c: 5014 m². Ynskiligt er, at ein partur av matriklinum, skal fara til fríøkið til komandi íbúðarbygging á ognunum omanfyri.

Tórshavnar kommuna hevur fingið virðrismett ognirnar sí niðanfyri.

| Matr. nr. | Adressa. | Vídd | Viðm. | Byggisamtykt. |
|---|---|---|---|---|
| 1107, 1108 og 1170, Tórshavn. | | 35.779 | Bústaðarøki. | A2. Høg Bústaðarbygging. |
| Tórshavnar kommuna. | | | | |

| | Mett virði kr. | kr/m2. |
|---|---|---|
| Skyn | 28.623.200,00 | 800 |
| Betri Heim. | 22.000.000,00 | 615 |
| Meklarin | 40.000.000,00 | 1.118 |
| Miðjal. | 30.207.733,33 | 844 |

Út frá kanningini eru hesar treyir settar útbjóðingini av nevndu matriklum:

- at byggjast skulu íbúðir á matr.nr 1108 og 1107, Tórshavn
- at frílendi til útstykkingina verður á parti av matr.nr. 1166c, ið liggur niðanfyri 1107
- at byggingin ikki kemur at framstanda sum kassar við monotonum framsíðum
- at vegatkoma til útstykkingina verður eftir Gráasteinsgøtu
- at gøtufarleið skal verður knýtt í Rossagøtuna, oman gjøgnum 1107 og 1166c og bundin í Marknagilsvegin.
- at komandi eigarin og útstykkjarin tekur á seg allan kostnað av at gera veg eftir Gráasteinsgøtu, gjøgnum matr. nr. 1108 og 1107 og yvir til matr. nr. 1170, Tórshavn

Kommunan eigur eisini matrikkul 1170, sum somuleiðis liggur í A2-byggisamtyktarøkinum, har byggjast kunnu íbúðarhús í fleiri hæddum. Við treytini omanfyri tryggjar kommunan sær, at tað ber til uttan kostnað at binda í vegin, um útstykkjað verður á matr.nr. 1170 seinni.

Aðrar fortreytir, útbjóðingartreytir og formligar treytir í sambandi við útbjóðingina, og so statt útstykking á matr.nr. 1107, 1108 og 1166c, verða settar ávíkavist í útbjóðingartilfari og í sambandi við eina komandi byggimálsviðgerð. Tað verði seg treytir um sølu, bygging og byggilist, orkuskipan og viðurskifti s.s. kloakk, burturbeining av yvirflatu- og spillvatni v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A2 í 3. grundumráði eru:

1. *Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

2. *Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.*

3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

5. *Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/05694-2 Kortskjal
22/05694-2 Presentatión 11-10-2018 TK.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at bjóða matr.nr. 1107, 1108 og 1166c út til bygging av íbúðum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum, men mælir til, at økið verður sett av til bygging av eldrabústøðum umframt vanligur bústøðum í einum møguligum samstarvi við Bústaðir.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen, Ruth Vang og Kristian Martini Skála.

Blankt atkvøddu: Jón Kragesten og Turid Horn.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata inn tilboð tann 13. februar 2023 var farin, vóru tvey tilboð innkomin.

**RPM Projektmenning kr. 9.100.000,00**
**Articon kr. 5.200.000,00**

Útbjóðingartilfarið ásetti, at um fleiri tilboð komu inn, so var enn ein tilboðsrunda, har møguligt var at lata hægri boð inn. Seinna freistin at lata tilboð inn var 20. februar 2023, og tá freistin var farin, var Articon einasti tilboðsgevari. Tilboðið fyri hesar er áljóðandi:

**kr. 11.300.000,00**

Boðið frá Articon er við Henning Larsen sum ráðgeva. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað á kr. 434,6 fyri teir 26.000 fermetrarnar. Articon hevur latið ein bókling inn, sum lýsir dømir um bygging á matr.nr. 1112, 1108, 1107 og 1170 í bústaðarhøpi, tilsamans eitt øki upp á 60.000 fermetrar. Ta samlaðu gólvvíddina hava teir roknað til 46.740 fermetrar, harav 11.250 fermetrar verða lagdir av til parkering v. tekjum, goymslu, tøkni, duri, uppgongd v.m. Talan er um eina heildarætlan av økinum við einum samlaðum tali á 492 bústøðum, sum hava eina miðalstødd upp á 95 fermetrar. Uppskotið gagnnýtir verandi hæddarmunin á lendinum til at útvega eitt rættvíst útsýni til allar íbúðirnar. Bygningarnir leggja seg eftir verandi hæddarkurvum og varðveita útsýnið fyri hvørjum øðrum. Millum bygningarnar verður gott pláss at skapa rekreativ øki so sum grønar lundir, spælipláss og felagsøkir. Víst verður til skjal nr. 22/05694-7, Hugskot og lýsing.

Verandi íbinding til Marknagilsvegin er, sum nú er, avbjóðandi, og ein slík útbygging fer at leggja enn størri trýst á vegin. Talan er um ein nýggjan býling við einum íbúgvatali ímillum 1000-1500 fólk. Vit kunnu staðfesta at henda verkætlanin avleiðir nakrar tekniskar verkætlanir (kloakk, yvirflatuvatn og vegaføring), ið eru neyðugar at seta í verk fyri at kunna gera hesa víðkan av býnum.

Tekniska deild hevur gjørt kostnaðarmeting av teimum avleiddu verkætlanunum:

| | | |
|---|---|---|
| Vegur | kr. | 2.400.000,00 |
| Kloakk | kr. | 283.000,00 |
| Yvirflatuvatn | kr. | 684.000,00 |
| **Í alt** | **kr.** | **3.367.200,00** |

Nágreinan av teknisku verkætlanunum:
**Vegur:** Gráasteinsvegur skal breiðkast frá matr.nr. 1108 til vegin Undir Gráasteini, og ein partur av vegnum Undir Gráasteini skal breiðkast.
**Kloakk:** Dagføring av kloakkini skal gerast frá Gráasteinsvegi og beint omanav til Marknagilsvegin.
**Yvirflatuvatn:** Ein ætlan at leiða yvirflatuvatn burtur skal gerast.

Mælt verður til, at nýggj verkætlan verður stovnað til at seta í verk avleiddu verkætlanirnar, og at kostnaðurin fyri tær avleiddu verkætlanirnar verður fíggjaður av lendissøluni.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- at Articon fær í boði at keypa matr. nr. 1107, matr. nr. 1108 og part av matr. nr. 1166c fyri tilboðsupphæddina áljóðandi kr. 11.300.000,
- at umsitingin fer í samráðingar við Articon um endaligu skipanina av økinum,
- at nýggj verkætlan verður stovnað til avleiddu verkætlanirnar, og at hesar verða fíggjaðar við kr. 3,4 mió. av tilboðsupphæddini/lendissøluni,
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

## 97/23 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 14.01.2016 | 10/16 | 15/04352-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 9/16 | 15/04352-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 12/16 | 15/04352-4 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 13/16 | 15/04352-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 77/16 | 15/04352-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 69/16 | 15/04352-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 29/16 | 15/04352-4 |
| 9 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 42/16 | 15/04352-4 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 140/16 | 15/04352-4 |
| 11 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 116/16 | 15/04352-4 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.11.2016 | 107/16 | 15/04352-4 |
| 13 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 428/16 | 15/04352-4 |
| 15 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 343/16 | 15/04352-4 |
| 16 Tekniska nevnd | 10.01.2017 | 5/17 | 15/04352-4 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 6/17 | 15/04352-4 |
| 18 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 9/17 | 15/04352-4 |
| 19 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 38/19 | 15/04352-4 |
| 20 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 48/19 | 15/04352-4 |
| 21 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 65/19 | 15/04352-4 |
| 22 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 25/20 | 15/04352-4 |
| 23 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 43/20 | 15/04352-4 |
| 24 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 10/23 | 15/04352-4 |
| 25 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 79/23 | 15/04352-4 |
| 26 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 73/23 | 15/04352-4 |
| 27 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 97/23 | 15/04352-4 |

**Málslýsing**
Íbúgvar í Traðabrekku vísa á truplu atkomuviðurskiftini, tí brekkan til økið er so brøtt, serliga um veturin, tá kavi og hálka er. Tí vísa teir á møguleikan at binda eystara enda av Traðabrekku í Hoyvíksvegin. Økið millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin, matr. nr. 726c, er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at gera vegakomu á matr.nr. 726c, Tórshavn og sostatt knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at gera vegatkomuna, men væntast kann at kostnaðurin verður uml. 1 mió. kr.

Spurningurin um ferðsluviðurskifti á vegamótinum við Hoyvíksvegin/Stoffalágvegin er ikki viðgjørdur enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin og at farast skal undir planleggingararbeiðið at leggja fyri nevndina. Mælt verður eisini til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið við atliti til fígging av kto. 8175 aðrar vegaætlanir 2016.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 14. januar 2016:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum. Ferðsluteljingar verða gjørdar.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið beint aftur í teknisku nevnd vegna ógreið viðurskifti viðvíkjandi ognini 726c og áður samtyktum ætlanum við økinum.

**Ískoyti:**
Málið um matr. nr. 726c, Tórshavn, tók sín uppruna í 2002, tá ið kommunan keypti ognina við tí endamáli at fáa vegasamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/03899, har tað framgongur, at málið um vegatkomu í byggi- og býarskipanarnevndini 10. oktober 2014 var broytt til at fevna um gøtusamband og p-pláss umframt eitt stykki til at selja. Fíggjarnevndin hevur síðani tikið undir við byggi- og býarskipanarnevndini, har stykki til møguliga sølu verður uml. 500 fermetrar til víddar og at írestandi økið út móti Hoyvíksvegnum verður lagt út til alment parkeringsøki.

Víst verður harumframt til mál nr. 14/0385, 2010-1738 og 2010-1513, har borgarar hava sýnt ognini áhuga.

Málið er sostatt ongantíð komið til teknisku nevnd

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Nevndin staðfestir samtyktina frá 13. januar 2016 og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til hesi mál:

1) mál nr. 2002-1884, Tórshavnar kommuna hevur keypt matr.nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a. Húsini eru millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, við tí endamáli, at taka húsini niður og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin.
2) Mál nr. 14/03899, Fíggjarnevndin hevur samtykt at skipa økið sambært tekning, við gøtusambandi millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, einum sethúsagrundøki á uml. 500 m$^2$ og alment parkeringsøki.

Vísandi til mál nr. 14/03899, har býarskipanardeildin hevði eina søguliga gjøgnumgongd av málinum og vísti á, at Tórshavnar kommunnu í 2004 keypti ognina matr. nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a, við tí endamáli, at taka húsini niður, og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin. Mælt var til, at beina málið í teknisku nevnd og ferðslunevndina til støðutakan um vegagerð yvir matr. nr. 726c frá Traðabrekku til Hoyvíksvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Ferðsluteljingar eru gjørdar við vegamótið Hoyvíksvegur/Stoffalág. Teljingin var frá 02.03 – 09.03. 2016. Tá koyrt verður frá býnum, eru tølini: 3963 áðrenn snarað verður inn á Stoffalágvegin, og 3119 eftir vegamótið. Tølini eru ársdøgnmiðalferðsla.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Nú ferðsluteljingar eru gjørdar, metir nevndin, at einki er til hindurs fyri at gera eina íbinding.

**Tilmæli:**
Í framhaldi av tilmælinum til teknisku nevnd 13. januar 2016 og tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 4. mars 2016, mælir byarverkfrøðingurin til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegaætlanir 2016, konto 8175, til at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot og kostnaðarmeting til vegagerð millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin ávikavist við og uttan 10 parkeringspláss (sí j. nr. 15/04352-24 og 26.).

Umboð fyri grannalagið kring Traðabrekku eru kunnað um uppskotið og í skrivi, dagf. 22. oktober 2016, sum er stílað til teknisku nevnd, siga umboðini seg taka undir við uppskotinum (sí j. nr. 15/04352-25).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum við 10 parkerings plássum, at arbeiðið verður sett í útboð millum innboðin, og innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera vegin og 10 parkeringspláss var boðið út til fýra arbeiðstakarar, trý tilboð komu inn og vóru tey hesi:

- P/F Articon kr. 1.232.307,- uttan MVG
- Sp/f Maskinkoyring kr. 1.464.545,- uttan MVG
- Sp/f R. J. Brockie kr. 1.072.958,- uttan MVG

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting við støði í tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie, sum vísir at útbodna arbeiðið kann gerast fyri tilsamans kr. 1.737.271,- tá MVG, útboð, byggileiðsla, fakeftirlit, trygging umsiting og óvæntað er íroknað (sí j.nr. 15/04352-33).

Undanfarin játtan til arbeiðið er kr. 300.000,- og írestandi upphæddin er sostatt kr. 1.437.271,- fyri at takast kann av tilboðnum frá Sp/f R. J. Brockie uppá arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at gera sáttmála við Sp/f R. J. Brockie um arbeiðið, at játtaðar verða kr. 1.440.000,- afturat til arbeiðið, fíggjað av ætlaðum íløgum til vegir í 2017 og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Eftir at kunnað var um ætlaðu vegagerðina í skrivi dagf. 11. november 2016 til grannar við Láarvegin og Hoyvíksvegin og sum liggja uppat ætlaðu vegagerðini, vendir ein granni aftur tann 29. november 2016 við áheitan um innlit og umbøn um skotbrá til at gera viðmerkingar til ætlaðu vegagerðina.

Nevndi granni vendir síðani aftur við mótmælisskrivi, dagf. 8. desember 2016, (sí j. nr. 15/04352-39) og vísir m.a. á, at íbúgvar við Traðabrekku framanundan hava atkomu frá Traðavegnum og Láarvegnum og at tað koma at verða fýra vegir sum møtast millum húsini, har sýnið farmanundan er sera vánaligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin staðfestir samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 10. januar 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at viðgera innkomin mótmæli.

**Ískoyti:**
Í í skrivi, dagf. 14. januar 2017, hava átta borgarar við Traðabrekku vent sær til kommununa at mótmæla ætlaðu vegagerðini, sum eftir teirra fatan ger umstøðurnar verri tá talan er um m.a. ferð og parkering og biðja samstundis um fund, at finna bestu loysnina.

Á fundi tann 3. februar 2017 høvdu umboð fyri nevndu borgarar høvið at greiða kommunalu fyrisitingini frá sínum sjónarmiðum og vístu m.a. á gøtusamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin sum betri loysn.

**Tilmæli:**
Við fyriliti fyri trygdini í hálku á Traðabrekku, mælir tekniski stjórin til, at nevndin gongur meirilutanum av teimum sum hava vent sær til kommununa á møti, við at staðfesta samtykt nevndarinnar frá 29. november 2016.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Samtykt at umsitingin kannar hvussu nógv parkeringspláss kunnu skipast á økinum.

**Ískoyti:**

Ráðgevi hevur eftir áheitan frá umsitingini útvegað kommununi uppskot til skipan av økinum til parkering, har tilkoyringin ávikavist er frá Hoyvíksvegnum og frá Traðabrekku.
Á økinum, sum er góðar 1000 fermetrar til víddar, er eftir hesum uppskotum í báðum førum pláss fyri 31 Parkeringsbásum (sí ávikavist j. nr. 15/04352-53 og j. nr. 15/04352-51).
P-plássið við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum hevur ráðgevi kommununnar kostnaðarmett til kr. 1.930.000,- uttan MVG, prosjektering, trygging, byggileiðslu, fakeftirlit v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til, at uppskotini um parkering verða latin grannalagnum til hoyringar.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skriv varð sent grannalagnum við Traðabrekku á 25 adressum, við umbøn um viðmerkingar til tey tvey uppskotini til skipan av økinum millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin til parkering uttan gjøgnumkoyring, men við tilkoyring frá Hoyvíksvegnum ella í øðrum lagi frá Traðabrekku.

12 svarskriv, sum komu aftur, umboða ymisk sjónarmið og grundgevingar, men kunnu í høvuðsheitum bólkast nakað soleiðis:

1. Eingin ynskir P-pláss við innkoyring frá Traðabrekku og mótmælt verður staðiliga hesi loysn.
2. Flestu seta seg ikki ímóti, at P-pláss kemur við innkoyring frá Hoyvíksvegnum og nøkur viðmæla hesi loysn, men ynskja kunning áðrenn nakað verður sett í verk.
3. Fleiri ynskja, at P-plássið undir ongum umstøðum verður gjørt við gjøgnumkoyring.
4. Nøkur ynskja, at P-plássið verður gjørt við gjøgnumkoyring til Traðabrekku og at brekkan av trygdarávum verður stongd til blindveg.

Ad 1:
Mótmælið móti at P-pláss verður gjørt við innkoyring frá Traðabrekku verur grundgivið við tilvísing til at ferðslutrýstið á Traðabrekku vil økjast munandi til ampa fyri ferðslutrygdina í økinum. Millum tey sum mótmæla hesi loysn, eru umleið 50 íbúgvar við Láarvegin omanfyri, har tilkoyring er til Traðabrekku og hava hesi latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad 2:
Nøkur vísa á, at tørvur er á P-plássum í økinum og onkur sigur seg kunna nýta P-plássið, tá kavi er.

Ad 3:
Grannarnir á eystur síðuni á Traðabrekku 4-26 næst møguligum P-plássi, umboðandi 8 adressur, hava latið mótmæli inn við undirskriftum til mótmæli av hesum.

Ad4:
Víst verður til at grannalagið upprunaliga vendi sær til kommununa orsakað av vánaligu trygdini í brøttu brekkuni og at tey, tá kavi er, eru uttan vanligar tænastur so sum neyðsendarakfør, læknavitjan, renovatión og TAXA til t.d. læknaørindi v.m. og at eitt P-pláss á ongan hátt nøktar henda tørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at at parkeringspláss verður gjørt við atkomu frá Hoyvííksvegnum, at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina, at arbeiðið verður boðið út og at tilboðini verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at senda málið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

**Ískoyti:**

Málið hevur verið til grannakunning og til ferðslugrannskoðan.

Megin niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini eru hesar (sí j. nr. 15/04352-83):

- P-plássið eigur at verða gjørt við gjøgnumkoyring frá Hoyvíksvegnum til Traðabrekku.
- Traðabrekka eigur av trygdarávum at verða gjørd til blindveg, móti ávikavist Láarvegnum og Traðarvegnum.
- At gøta, sum skilur gangandi frá bilferðluni, eigur at verða gjørd framvið P-plássinum.
- At vegamótið millum P-plássið og Hovíksvegin eigur at verða flutt nakað norðureftir fyri at fáa frástøðu til vegamótið Stoffalág – Hoyvíksvegur.

Umsitingin hevur útvegað skitsuuppskot frá ráðgeva, sum er í samsvar við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini. Eftir hesum uppskoti verða 23 P-pláss á økinum (sí j. nr. 15/04352-84).

Skitsuuppskotið hevur við sær, at umleið 52 fermetrar av lendi mugu útvegast burturav grannamatriklinum 727c norðan fyri P-økið og hevur ánarin av nevnda matrikli, sagt seg sinnaðan at selja lendið til kommununa eftir nærri avtalu.

Sunnan fyri ætlaða P-økið hevur ánarin av grannamatriklinum 726h ynski um marknaumskipan móti P-økinum, soleiðis at P-økið verður nakað longur burturfrá sethúsum hansara. Skitsuuppskotið til P-økið hevur fyrilit fyri hesi marknaumskipan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti, sum er í samsvari við niðurstøðurnar frá ferðslugrannskoðanini og at grannarnir verða kunnaðir um avgerðina.
2. At umsitingin tekur stig til at fáa í lag tillaging av matrikulmarki samsvarandi skitsuuppskotinum.
3. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt taka undir við tilmælinum, tó so at eingin gjøgnumkoyring verður til Traðabrekku frá parkeringsplássinum.

**Ískoyti:**
Ánarin av grannamatriklinum nr. 726h sunnan fyri ætlaða P-økið hevur fráfallið ynski sínum um marknaumskipan móti P-økinum.

Ánarin av grannamatriklinum nr. 727c, norðan fyri P-plássið, sigur seg sinnaðan at lata lendi til innkoyringina frá Hoyvíksvegnum, men ikki fyri pening.
Ístaðin er ynski hansara, at kommunan steinsetur tann partin av hansara grundøki, sum er vátlendi og mold verður løgd á steinsetingina, soleiðis at grundøkið hansara hereftir verður væl drenað og vætan burturbeind.
Um ynski um steinseting og drening av grannastykkinum skal gangast á møti, er neyðugt at gera verkætlan við forkanningum og virðismeting v.m., sum skal góðtakast av pørtunum.
Um ætlanin, at gera innkoyringina til P-økið yvir grannamatrikulin 727c, verður slept og uppskotið um P-plássið verður umskipað, soleiðis at innkoyringin frá Hoyvíksvegnum ístaðin verður gjørd yvir kommunalt lendi, gerst málið um P-plássið munandi einfaldari og helst eisini bíligari at fáa í lag.

Ráðgevi kommununnar hevur á skitsuuppskoti lýst hvussu P-plássið kann skipast við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi og 31 P-plássum (sí j. nr. 15/04352-91).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At parkeringspláss verður gjørt við støði í nevnda skitsuuppskoti við innkoyring frá Hoyvíksvegnum yvir kommunalt lendi (sí j. nr. 15/04352-91 P-pláss uttan gjøgnumkoyring).

2. At játtaðar verða kr. 150.000,- av konto 8110 Rakstur av vegum 2020, til prosjektering og útboð av arbeiðinum.
   At innkomin tilboð verða løgd fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Borgarar í og við Traðabrekku hava víst á viðurskifti við skitsuuppskotinum (sí. Jnr. 15/04352-91 (P-pláss uttan gjøgnumkoyring)), sum ikki eru samsvarandi við tey ynskir, sum borgararnir upprunaliga ynsktu fyri gøtuna.

Í januar 2023 hava borgararnir í gøtuni latið umsitingini undirskriftir, har víst verður á, at ynski enn er um at gera ábøtur á ferðsluligu viðurskiftini í gøtuni.

Á borgarafundi 31.01.2023, har býarverkfrøðingurin og formaðurin í teknisku nevnd eisini luttóku, vóru sjónarmiðini hjá borgarunum í gøtuni løgd fram. Samanumtikið varð víst á, at borgararnir í gøtuni ynskja, at:

1. Trygdin fyri bilaferðsluna verður raðfest, soleiðis at koyrandi verður beinleiðis í Hoyvíksvegin.
2. Trygdin fyri gangandi verður raðfest soleiðis at:
   a. Trygg gonguleið verður millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin
   b. Trygg gonguleið verður gjørd millum Láarveg og Traðaveg við hóskandi gongubreyt og rekkverki.
3. Avvatningin á brekkuni millum Lágarveg og Traðaveg verður dagførd, soleiðis at hálka í størri mun verður fyribyrgd.

**Skjøl**
15/04352-100 traðarbrekka-hoyvíksvegur 2-0

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Dagføring av Traðabrekku | 1.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
| --- | --- | --- |
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.800.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarvekfrøðingurin mæla til, at:

- heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við ráðgeva um prosjektering, og við arbeiðstakara um fremjan av hesum arbeiðum innan ein karm á tilsamans kr. 1.800.000.
- hetta verður fíggjað á nýggja verkætlan, Dagføring av Traðabrekku, av konto 8175 Vegir (íløgur) LK 81999 Vegaverkætlanir.

málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið av skrá.

# 98/23 Árligt viðlíkahald á kommunalu brennistøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.01.2022 | 6/22 | 22/00107-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 42/22 | 22/00107-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 19/23 | 22/00107-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 103/23 | 22/00107-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 98/23 | 22/00107-1 |

**Upprunin til málið**
Í okt. 2020 vísti ein kanning (sí undir skjøl) av Kommunalu brennistøðini á átroðkandi ábøtur. Ein dagførd kanning millum jóla 2021 vísti, at síðuveggirnir í brenniovninum, sum eisini eru køliflatur, eru í verri standi enn væntað, sum undirstrikar tørvin á einum størri viðlíkahaldi, ið er nakað meiri víðfevnt enn vanliga árliga umvælingin. Múrverkið varð neyðturviliga umvælt, so tað vónandi heldur til ætlaða árliga viðlíkahaldið, sum eftir ætlan verður beint eftir páskir, um tað eydnast at fáa eykalutirnar til tíðina.

**Lýsing av málinum**
Fyri ikki at støðga upp í úrtíð, tørvar Kommunalu Brennistøðini eitt meiri víðfevnt viðlíkahald og útskifting enn vanlig ár. Serliga er talan um størri umvæling av ovninum og útskifting av kølaranum. Brennistøðin skal so at siga til klassingar.

Endamálið við hesum er fleirtáttað:
- at gjøgnumganga ovn, pumpur o.a. fyri tørv á øðrum umgangandi og framtíðar viðlíkahaldi og útskifting,
- at fyribyrgja havarí, sum kunnu elva til støðgir í upp í fleiri mánaðir,
- at tryggja, at støðin heldur umhvørviskrøvini til útlát, og at hon so at siga ikki fær "siglingarbann" (sí næsta punkt),
- at skifta ótættar síðuveggir, so tað slepst frá ótilætlaðari luft til brenningina, ið elvir til lægri hita, minni effektiva brenning, lægri "framleiðslu", og at umhvørviskrøvini til roykútlát ikki kunnu haldast,
- at umvæla annað, sum elvir til ótilætlaðar støðgir, óneyðuga dálking og lægri virknað,
- at leingja livitíðina hjá brennistøðini,
- at fáa mett, hvussu nógv ár støðin kann halda, um øll neyðug viðlíkahald og útskiftingar verða framd rættstundis.

Umframt átrokandi arbeiði á ovnin er eisini neyðugt at skifta summarkølaran til at køla avlopshita burtur, sum Fjarhitafelagið ikki megnar at brúka. Hóast heitið, summarkølari, er hann neyðugur og í nýtslu alt árið. Kølarin má til eina og hvørja tíð vera 100 % virkin. Sleppur brennistøðin ikki av við hitan, støðgar brenningin av ruski. Verandi kølari er tærdur og slitin og vorðin ov vánaligur til at umvæla. Tekniska fyrisiting metir tað vera ov vágið at bíða við at skifta kølaran, til hann gongur fyri. Veitingartíðin uppá nýggjan kølara er í minsta lagi 3 mánaðir, umframt tíð til flutning og uppsetan, tilsamans 4 mánaðir ella meiri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um heilt neyðugar umvælingar av brennistøðini fyri, at hon ikki í úrtíð skal koma at liggja lamin í longri tíð í senn. Í hesum sambandi kunnu væntast nakað størri útreiðslur enn í sambandi við árligu umvælingarnar seinnu árini. Tær flestu av hesum útreiðslum vórðu fyrilagdar í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2022.

Fyrisitingin er í holt við at fáa til vega dagførdar kostnaðarmetingar og tilboð upp á neyðug arbeiðir og útgerð, sum verður fyrilagt, tá tølini eru tøk.

Um tað ikki er møguligt at útvega neyðugu eykalutirnar til viðlíkahaldið, sum er ásett til at verða beint eftir páskir, verður stóra viðlíkahaldið útsett til heystið 2022. Ovnurin verður tó kannaður við jøvnum millumbilum fyri at tryggja, at alt koyrir eftir ætlan, til viðlíkahaldið verður gjørt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Boilerworks service - 2020: Tilstandsvurdering

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. januar 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tað í málslýsingini fráboðaða viðlíkahaldið av Kommunalu brennistøðini verður frá 20. oktober til 16. november 2022. Meðan viðlíkahaldið gongur fyri seg, støðgar brenningin. Væntaði kostnaðurin sambært tilboðum og metingum er um kr. 7,5 mió.

Av tí at støðgurin er so mikið langur, og at IRF bert fær tikið ímóti einum eykabili um samdøgrið, slepst ikki undan at flyta rusk av landinum. Upplýsti kostnaðurin er íroknað skift av kølara og flutningi av burturkasti til brenningar uttanlanda.

Fyri at støðgurin ikki skuldi gerast enn longri, verður ein partur av ætlaða viðlíkahaldsarbeiðinum, og sum kann tola at bíða, framdur í 2023.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sum lýst omanfyri var um ársskiftið 2021/2022 staðfest átroðkandi tørvur á munandi viðlíkahaldi av Kommunalu brennistøðini (KB), sum eisini undirbygt av frágreiðingunum ísv. viðlíkahaldini í 2020 og 2021

(sí *Tilstandsvurdering 2020* og *Inspektionsrapport 2021*). Eisini verður víst til frágreiðing frá SMJ frá desember 2020: *Kanning av ruskøkinum í Tórshavnar kommunu*.

Summarkølarin verður nýttur til at køla tann partin av hitanum burtur, sum Fjarhitafelagið ikki megnar at taka ímóti. Fjarhitafelagið megnar vanliga í miðal bert at taka ímóti um 70% av hitanum frá KB, um veturin nakað meiri, í summhálvuni bert um 50%. Í 2022 tók Fjarhitafelagið í miðal ímóti 69% av hitanum frá KB.

Um summarkølarin á brennistøðini gongur fyri, má brenningin steðga, tí tað gerst torført ella ógjørligt at stýra hitanum í ovninum, sum kann oyðileggjast fullkomiliga, um hitin gerst ov høgur.

At reka eina brennistøð við lekandi ella ongum summarkølara er sum at koyra bil við lekandi kølara ella ongari olju, so brennir motorurin saman. Soleiðis er eisini við ovninum á brennistøðini.

Í nevndu frágreiðingum verður eisini víst á skaðar, ið eru komnir av ov høgum hita og av tørvandi vatni í skipanini, sum sannlíkt stendst av ymsum lekum, ið ikki altíð kunnu staðfestast, fyrr enn skaðin er hendur.

Harumframt var hol á stálsíðunum uttan á ovninum, sum hevði við sær, at ovnurin tók falska luft inn. Hetta gjørdi tað torført ella ógjørligt at stýra hitanum, sum, umframt at elva til brot á umhvørvisgóðkenningina hjá KB, økti vandan fyri fleiri skaðum. Eisini vóru hópin av slitdeilum sera illa farnir, sum aftur gjørdi tað torført m.a. at stýra brenningini og kundi elva til enn fleiri skaðar.

Í desember 2021 vísti leiðslan á brennistøðini á, at summarkølarin var so tardur, at hann ikki kundi umvælast, og at stórir partar av honum longu vóru óvirknir. Ávarað varð tí um vanda fyri ótilætlaðum støðgi í úrtíð. Funnið varð síðani fram til, at veitingartíðin av nýggjum summarkølara var í minsta lagi 3 mánaðir, umframt flutningstíð og uppsetan. Um illa vildi til, og t.d. summarkølarin gekk heilt fyri, og Fjarhitafelagið samstundis ikki kundi taka ímóti øllum hitanum, kundi brennistøðin liggja óvirkin í úr 4 og upp í 6 mánaðir.

Í hesum tíðarskeiði hevði óivað verið møguligt at balla og avskipa burturkastið, lutvíst til IRF, í høvuðsheitum til útlond. Metti kostnaðurin av hesum kundi gerast munandi dýrari enn viðlíkahaldið. Harumframt kundi KB undir slíkum støðgi ikki veita fjarhita, sum hevði ført við sær munandi útreiðslu hjá Fjarhitafelagnum til at brenna olju í staðin.

Eisini vísti leiðslan á KB á, at standurin á brennistøðini hevði við sær, at KB ikki fekk brent líka stórar mongdir, sum, um brennistøðin var viðlíkahildin til fulnar. Trýstið á brennistøðini hevði havt við sær, at brent hevði verið í alt ov nógvar tímar um árið til, at tað var gjørligt at fremja teir tilmældu viðlíkahaldsstøðgirnar.

Fyri at halda seg innan fyri ráðiligan rakstur skal ein og hvør brennistøð í minsta lagi hava ein størri, árligan viðlíkahaldsstøðg, umframt regluligar støðgir við 6-8 viku millumbili fyri at reinsa, fremja eftirlit og bráfeingis viðlíkahald. Fyri at slík arbeiði skulu vera møgulig, er neyðugt at støðga brenniningini og køla skipanina niður, áðrenn fólk sleppur inn í ovnin og til aðrar heitar lutir at arbeiða. Hvør av hesum støðgum tekur tí nakrar dagar, uttan mun til hvussu stórur tørvurin á viðlíkahaldi er.

Samlað merkir tað, at tað við ráðiligum rakstri bert er møguligt (og tilrátt) at brenna um 80% av tíðini, og á einari nýggjari brennistøð við minimalum viðlíkahaldstørvi í mesta lagi 85% av tíðini. Tess eldri ein brennistøð er, tess meiri tíð skal setast av til viðlíkahald. Tess verri standi brennistøðin er í, tess minni megnar hon at brenna.

Fyri at fylgja við økjandi nøgdunum av burturkasti hevur KB seinnu árini brent ímillum 88 og 94 % av tíðini. Tað hevur havt við sær, at tað ikki hevur verið gjørligt at fremja alneyðugar støðgir til at reinsa og fremja eftirlit og bráfeingis viðlíkahald, og tískil at reka brennistøðina á ráðiligan hátt.

**Kostnaður**

Undantikið 2018, tá stjóraskifti var á KB, og einki størri viðlíkahaldsarbeiði var framt, hevur árligi kostnaðurin av viðlíkahaldi á KB seinnu árini í miðal verið kr. 5,6 mió., vaksandi frá kr. 4,7 mió. í 2019, kr. 5,9 mió. í 2020, og kr. 6,3 mió. í 2021.

Bert í heilt serligum føri er peningur játtaðar sum íløgur, og hevur tað veri til størri umvælingar/útskifting.

Seinasta árið er rakstrarjáttanin til KB økt nakað, men tað er fyri at taka hædd fyri øktu útreiðslunum av samstarvinum við IRF um tyrving og viðgerð av rottangaevju á Nýggjheiðum omanfyri Kvívík.

Tá málið um árliga viðlíkahaldið á KB fyri 2022 varð lagt fyri Náttúru- og Umhvørvisnevndina 4. oktober 2022, var metti kostnaðurin av viðlíkahaldinum um kr. 7,5 mió. Men av tí tað ikki var greitt, hvussu nógv av hesum kundi fíggjast yvir raksturin var avgjørt at leggja málið um eykajáttan fyri aftur seinri.

Viðlíkahaldsarbeiðið, sum vanliga hevur verið framt um várið, mátti vegna langa veitingartíð uppá avgerandi lutir, serliga summarkølaran, útsetast til um heystið. Arbeiðið varð útint í oktober-november 2022.

Tá síðurnar á ovninum blivu niðurtiknar, vísti tað seg, at støðan var verri enn mett frammanundan, og gjørdist arbeiðið í sambandi við viðlíkahaldsstøðgin og útflutning av burturkasti heilar kr. 9,7 mió. og sostatt munandi kostnaðarmiklari, enn væntað hevði verið. Budgetterað varð við útflutningi av 800 tonsum, men bleiv veruliga mongdin 1130 tons.

Upplýsingarnar um endaliga kostnaðin av viðlíkahaldsarbeiðinum vóru ikki tøkar fyrr enn eftir ársskiftið.

Afturat høga kostnaðinum av árliga viðlíkahaldinum komu eyka útreiðslur í 2022 fyri um kr. 2 mió., sum koma av at rudda Húsahaga og umvæla gamla maskinu.

Í november 2022 varð ætlan og avtala gjørd um at útflyta jarn í desember 2022. Tá hetta í desember skuldi setast í verk, var maskinan til at avskipa jarn á verkstaði, soleiðis at avskipingin mátti útsetast til byrjanina av 2023. Hetta hevði við sær, at inntøkan av sølu av jarninum á um kr. 4,5 mió. ikki kundi bókførast fyrr enn í 2023.

Samlað førdi hetta við sær eina meirnýtslu á Kommunalu brennistøðini fyri 2022 á kr. 11,7 mió.

Verður inntøkan av teirri í desember 2022 ætlaðu søluni av jarni drigin av meirnýtsluni fyri 2022, er útroknaða meirnýtslan kr. 7,2 mió.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eina ætlan fyri at javna meginpartin av meirnýtsluni í rakstrinum fyri 2023.

Tey mest átroðkandi viðlíkahaldsarbeiðini á brennistøðini blivu framd í 2022. Í mun til miðal útreiðslustøðið fyri árligt viðlíkahald á kr. 5,6 mió. árliga, verður mett, at sparast kunnu kr. 1,5 mió. í viðlíkahaldsútreiðslum í 2023, sum væntandi kunnu haldast á einum støði á um kr. 4,1 mió.

Útroknaði eyka fíggjartørvurin fyri 2023 til at bera upp fyri meirnýtsluna í 2022 gerst sambært hesum sostatt kr. 3,2 mió., sum biðið verður um sum eina eykajáttan.

Lyklatøl:

| **Yvirlit** | **Kostnaður (mio)** |
|---|---|
| Meirnýtsla at fíggja í 2022 | -11,7 |
| Søla av jarni í 2023 | 4,5 |
| Mett meir inntøka | 2,5 |
| Mett sparing í viðlíkahaldi | 1,5 |
| Eyka Játtan | -3,2 |

Við eini eyka játtan uppá 3,2 milliónir verður mett, at fíggjarætlanin fyri KB í 2023 kemur at halda.

**Tekniska støðan á KB**

Brennistøðin, sum áðrenn viðlíkahaldsstøðgin var í vanda fyri ótilætlaðum brástøðgi í upp ímóti longri steðgi, er nú so mikið væl viðlíkahildin, at tað aftur er møguligt at stýra hitanum, sum álvarsliga hótti haldbarið av ovninum. Eisini er møguligt at halda umhvørviskrøvini til útlát í roykinum, sum ikki var møguligt áðrenn viðlíkahaldsstøðgin. Dygga viðlíkahaldið hevur eisini í aðrar mátar betrað munandi um vanliga raksturin.

Ein minni partur av neyðuga viðlíkahaldinum kundi og mátti útsetast til 2023. Var tað ikki útsett, hevði viðlíkahaldsstøðgurin blivið uppaftur longri og kostnaðurin av arbeiðinum og av útflutningi av burturkasti somuleiðis uppaftur hægri. Mett verður nú, at írestandi parturin av viðlíkahaldinum tolir at verða útsettur til byrjanina av 2024, soleiðis at rakstrarkostnaðurin fyri 2023 gerst minst møguligur, og kann haldast innan fyri tær nevndu kr. 4,1 mió.

Tá tann seinasti parturin av viðlíkahaldinum er gjørdur, kann brennistøðin tekniskt halda í nøkur ár afturat, treytað av tilmældum støðgum og árligum høvuðsviðlíkahaldi á kr. 5-6 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 7175 | Skiljihøll | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 7110 | | Renovatión | |

| **Upphædd** |
|---|
| 3.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 3,2 mió. av konto 7175 skiljihøll, á konto 7110 rakstur av brennistøðini, til at fíggja ein part av umvælingararbeiðinum, sum var gjørt í 2022 og at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 363<br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 99/23 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 48/20 | 17/03154-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 11/21 | 17/03154-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2021 | 47/21 | 17/03154-1 |
| 12 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 329/21 | 17/03154-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2022 | 15/22 | 17/03154-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 79/22 | 17/03154-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 68/22 | 17/03154-1 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.08.2022 | 32/22 | 17/03154-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 201/22 | 17/03154-1 |
| 18 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 190/22 | 17/03154-1 |
| 19 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.03.2023 | 8/23 | 17/03154-1 |
| 20 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 14/23 | 17/03154-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 102/23 | 17/03154-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 27.04.2023 | 134/23 | 17/03154-1 |
| 23 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 99/23 | 17/03154-1 |
| 24 Náttúru- og umhvørvisnevndin | | | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum ‘Grøna leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:
1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:
1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og CO2-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:

- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og CO2-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu

v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur  høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.
2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$- sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í seinasta ískoyti og framløgu varð nevnt, at fortreytin fyri at fáa eina grønari kommunu við 50% lægri $CO_2$-útláti í 2025 er, at kommunan játtar 13,5 mió. kr. um árið, umframt tað sum er játtað á rakstri og íløgu, íalt 15 mió. kr. hvørt ár í 6 ár 2020-2025, ella í alt 90 mió. kr.

Í 2020 vórðu játtaðar 5,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 3,5 mió. kr. vóru beinleiðis til orkupolitikkin.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 lækkar upphæddin til 4,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. fara til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 2,5 mió. kr. fara beinleiðis til orkupolitikkin.

Uppskotið til almenna orkupolitikkin (tekstur), ið byggir á upprunaligu ætlanina, at minka $CO_2$-útlátið 50%, er næstan klárt. Tó er áramálið nú bert 4 ár fram til 2025, og tí má árliga upphæddin til íløgur verða samsvarandi størri, uml. 22 mió. kr. um árið í 4 ár 2022-2025, um málið skal røkkast.

Ætlanin er at seta í verk gerð av faldara, við uppseting, tekningum og prenti og at fíggja hetta av rakstri, kontu 6610.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið at gera faldara, ið byggir á upprunaligu ætlanina í Orkupolitikkinum og Grønu leiðini, verður sett í verk og fíggjað av rakstri, konto 6610.

Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% í 2025 skal leingjast, vísandi til at neyðugur peningur ikki er settur av í 2020 og 2021.
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leingja málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% til 2027.

**Ískoyti:**
Elsa Berg, nevndarlimur, hevur biðið um at fáa málið lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina aftur. Hon vísir á, at á fyrsta fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini fekk nevndin eina frágreiðing frá umsitingini um umhvørvis- og orku politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Har varð staðfest, at vit fara beint øvugtan veg í mun til okkara útlátsmál, í og við at útlátið enn er í øking og at neyðugt er við sterkari átøkum og meira fígging.

Elsa Berg ynskir at nevndin viðger støðuna, og hvat skal til av átøkum og pengum, fyri at vit røkka málinum.

Hetta varð lýst, tá málið bleiv samtykt, men má dagførast.

Kunnað verður um málið og framløga.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna skal $CO_2$ útlátið hjá kommununi minka við 50% í 2027 í mun til 2016, og hetta skal gerast við at leggja dent á 3 høvuðsmál:

1. GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027
2. LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027
3. EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERÐA ELRIKNIR Í 2027

Á leið 90 mió. kr. skulu fram til 2027 brúkast á orkuøkinum, um hesi mál skulu røkkast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina ætlan fyri 2022, fyri hvørt av teimum trimum orkumálum, sum skal tryggja, at ferð kemur á grøna orkuskiftið í kommunala geiranum. Harumframt verður uppskot lagt fram um, hvussu umsitingin kann skipa seg í arbeiðsbólk og arbeiða víðari við mannagongdum og ársfrágreiðingum fram til 2027.

Útgangsstøði er tikið í eini samlaðari játtan á 8. mió. kr. til orkuátøk í 2022. Tað letur seg ikki gera at røkka orkumálunum við umrøddu játtanini, men kann hon vera fyrsta stig til at raðfesta orkuøkið hægri komandi árini.

*ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027*
Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 17 oljufýringar hjá TK skiftast til grøna orku á hvørjum ári frá 2021. Í 2021 vóru 8 oljufýringar skiftar út við fjarhita ella hitapumpu, og kommunan setir ikki nýggjar oljufýringar upp.

Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging. Hon kann nýta orku frá alskyns orkukeldum, og kann hon samvirka við aðrar partar av orkuinfrakervinum t.d. taka ímóti avlopsorku frá vindmegi og aðrari elframleiðslu, sum verður alsamt meiri týðandi í framtíðar grøna orkuinfrakervinum. Fjarhitanetið verður nýtt til at binda orkuframleiðslu og nýtsluna saman í kommununi og at gagnnýta orku, sum annars fer til spillis. Tí mælir umsitingin til at raðfesta íbinding í fjarhitanetið í 2022.

Eisini eru størri verkætlanir, ið umsitingin metir eiga at verða raðfestar komandi árini.
**Umsitingin ætlar at brúka 3,9 mió. kr. til at knýta 7 almennar bygningar í fjarhitaskipanina umframt 1,5 mió. til eitt orkuátak sambært fylgiskjali 1.**

*ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027*
Gøtuljós umboða áleið 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá kommununi. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar hesin parturin av el-nýtsluni á leið ein triðing, umframt at útreiðslan av hesari íløguni av tí sama verður spard aftur eftir fáum árum.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED hvørt ár. Tórshavnar kommuna eigur uml. 9.000 gøtuljós, av hesum eru áleið 2.600 skift til LED.

Higartil eru 710 gøtuljós skift í 2021.

**Umsitingin ætlar at brúka 1,6 mió. kr. til at skifta 570 gøtuljós til LED í 2022 sambært fylgiskjali 1, umframt at skifta gøtuljós fyri ta íløguupphædd frá 2021, sum ikki verður brúkt í ár, væntandi á leið kr. 500.000,-.**

*ORKUMÁL 3 - EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027*
Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 15 bilar skiftast til el hvørt ár frá 2021.

Í 2020 vóru 9 elbilar í kommununi. Í dag eru 13. Harafturat eru 2 elbilar skiftir út við nýggjar elbilar. Uml. 22 bilar skulu eftir ætlan skiftast í 2022. Aloftast stendst ein eykaútreiðsla av at skifta til el-bil heldur enn til ein bil riknan við steinolju, m.a. til løðistøðir o.a.

**Umsitingin ætlar at brúka 1 mió. til eykaútreiðslur av at skifta 10 akfør til el í 2022 sambært fylgiskjal 1.**

*Ætlan 2022-2027*
At gera mannagongdir, útlátsrokningar- og framskrivingar krevur nógva tíð og orku. Um kommunan verður betri til at skapa virði burturúr dáta um orkunýtslu- og framleiðslu kunnu vit seta í verk loysnir, sum tryggja at arbeiðið ber á mál.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skráseta orkudáta í Energykey, sum er ein skipan til at samla dáta og hava eftirlit við orkuøkinum í kommununi. Tá skipanin er klár, kann hon m.a. brúkast til at gera støðulýsingar og ætlanir fyri, hvussu kommunan fær sum mest burturúr sínum orkuíløgum, og geva innlit í, hvar tað er mest átroðkandi at minka um $CO_2$-útlátið og orkunýtsluna.

**Umsitingin ætlar at raðfesta at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing umframt eina ætlan fyri 2023-2027.**

Áðrenn Energykey verður klárt, verður neyðugt at dagføra útlátstølini fyri 2019, 2020 og 2021. Harumframt krevst eyka arbeiði at fáa øll dátu skrásett í Energykey, soleiðis at skipanin fevnir um alt orkuøkið og ikki,

sum støðan er nú, bert bygningar. Umsitingin hevur í hesum sambandi umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at eitt fólk verður sett í eitt verkætlanarsett starv til útiloðkandi at arbeiða við at dagføra útlátstølini og skráseta í Energykey.

Fyri at koma á mál við orkupolitikkinum er eisini neyðugt at menna samstarvið millum deildirnar. Fyrst og fremst eru tað bygningsdeildin, verkstaðið, vatn- og gøtuljósdeildin og umhvørvisdeildin sum eru beinleiðis knýtt at teimum 3 orkumálunum umvegis dagliga virksemið. Neyðugt verður at møtast regluliga fyri at fylgja støðuni, umframt at gera ætlan fyri 2023-2027.

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini leggja hervið uppskot fram um ætlanina fyri tey trý orkumálini í 2022:

- 3,9 mió. til at knýta 7 bygningar í fjarhitaskipanina
- 1,5 mió. til orkuátak
- 1,6. mió. til at skifta 570 gøtuljós til LED
- 1 mió. til at skifta 10 akfør til el

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlan m.a. at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing og ætlan fyri 2023-2027.

Mælt verður til at nýta kr. 200.000 av konto nr. 6610 hjá umhvørvisdeildini frá játtanini fyri 2021 til verkætlanarsett starv í uml. 4 mánaðir til at arbeiða við skráseting í Energykey og at dagføra útlátstølini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt at nýta aðrar kr. 100.000 til samskifti. Eisini verður heitt á umsitingina um at arbeiða víðari við orkuskifti í bygningum og koma aftur í nevnd við nýggjum tilmæli.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið at skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Bjørg Dam um at beina málið í náttúru- og umhvøvisnendina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum, 4 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam,Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging, og politiskt ynski er at binda fleiri kommunalar bygningar í hesa skipan. Bygningarnir í uppskoti til íbinding í 2022 eru hesir:

- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Fimi-HB-B36
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin
- Brúni skúli

Viðmerkjast skal, at Gundadalshøllin verður ikki íbundin, fyrr enn avgerð er tikin, um høllin skal umbyggjast, útbyggjast ella byggjast av nýggjum. Tryggjað verður, at klárt er at binda í høvuðsleiðina hjá fjarhitanetinum, tá avgerð er tikin hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at fyrisitingin fær heimild til:

At flyta 1 mió. av stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til nýggja verkætlan “Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar” undir stovnsnummar 6177 til at gera prosjekt, kostnaðar- og tíðarmeting til útboð av at íbinda nevndu bygningar í fjarhitanetið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við tí ískoyti, at heimild eisini verður givin til at seta arbeiðið í gongd at binda hvønn bygning sær í fjarhitanetið. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í mars 2022 vórðu 1 mió. kr fluttar av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og fara undir arbeiðið. Bygningarnir, har arbeiðið við at innleggja nýggja hitaskipan er boðið út, eru fylgjandi:

- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Brúni skúli (Fríðriksgarður)
- Guli skúli (Ytri skúli)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin

Arbeiðið varð boðið út umvegis útboðsportalin hjá Tórshavnar kommunu, og bjóðaðu í minsta lagi tvey feløg upp á arbeiðið við hvønn av bygningunum. Tikið er av tilboðunum frá fylgjandi feløgum: HVS Tænastan, Bjørnin, Orkuloysnir, Maria Poulsen.

Tíðarætlanin fyri arbeiðið er gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Grevstrararbeiðið og tað at taka upp og burturbeina oljutangar verður boðið út í næstum. Eftir ætlan verður farið undir arbeiðið, so tað er liðugt í 2022. Íroknað kostnað til at gera útbjóðingartilfar, sjálvt arbeiðið við grevstri, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar, og íbindingargjald verður samlaði kostnaðurin 4,5 mió. kr. Sostatt resta tað 3,5 mió. kr í fyri at útinna arbeiðið sambært innkomnu tilboðunum.

Eisini tíðarætlanin fyri arbeiðið við at binda skúlan á Argjahamri í fjarhitanetið verður gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Tað arbeiðið verður væntandi boðið út í næstum, soleiðis at neyðuga tilfarið kann fáast til vega, áðrenn farast skal undir arbeiðið.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum, íroknað skúlan á Argjahamri, er knappar 1.195.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og elframleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 284.528 kg $CO_2$ og 0,065 kg/ $CO_2$ pr. kr. pr. ár. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka við o.u. kr. 190.000.

Á karminum fyri konto 6177, orkupolitikkur, eru fyri 2022 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum eru kr. 1.000.000 játtaðar til at fyrireika og at leggja fjarhita inn í kommunalar bygningar. Til sama endamál er tørvur á kr. 3.500.000 afturat í 2022. Verða kr. 1.500.000 játtaðar til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu og kr. 1.000.000 til verkætlan um heita vatnið á Lygnnesi í Kollafirði, verða sostatt kr. 1.000.000 eftir til onnur orkuátøk í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:

- játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið,
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin ger og eftirsendir nevndini tíðarætlan.

Fíggjarnevndin 24. august 2022: Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið. Nevndin viðmerkir, at tíðarætlan fyri hvønn bygning sær skal fyriliggja, áðrenn arbeiðið verður sett í verk.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Á karminum fyri konto 6177, Orkupolitikkur, eru fyri 2023 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum verður skotið upp at flyta kr. 3,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og útinna arbeiðstøkur fyri 2023.

Arbeitt verður við at leggja nýggja hitaskipan í niðanfyristandandi bygningar:

- Ellisheimið
- Barakk við Ellisheimið
- Umlættingarheimið
- Dagstovnurin Løkjatún

Tíðarætlan fyri arbeiðið við at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið er treytað av gongdini við at útbyggja fjarhitanetið og verður tí gjørd í neyvt samráð við Fjarhitafelagið. Hetta merkir, at arbeitt verður eftir at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið so hvørt fjarhitanetið kemur verður ført fram við og er ført fyri at veita fjarhita við hvønn bygning. Møguliga kemur onkur bygningur/onkrir bygningar afturat, um útbyggingin av fjarhitanetinum í 2023 loyvir tí.

Íroknað kostnaðin er útbjóðing, arbeiðstekningar, graviarbeiði, brekking, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar og íbindingargjald.

Arbeiðið við at taka upp og burturbeina oljutangar verður gjørt eftirfylgjandi. Eftir verandi ætlan verður farið undir arbeiðið skjótast gjørligt, so tað er liðugt í 2023. Kostnaðurin av hesum er mettur til at verða kr. 3,5 mió.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum er knappar 35.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og el-framleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 8.000 kg $CO_2$. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | L61707 | Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar | |

| Upphædd |
|---|
| 3.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ókend |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til:
- at játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlan L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið, og
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. mars 2023:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti:**
Umhvørvisdeildin er biðin um fleiri upplýsingar og status fyri arbeiðini, sum vórðu ætlað í 2022. Víst verður til viðløgdu skjøl.

Í stuttum kann upplýsast, at í 2022 vórðu játtaðar kr. 4,5 mió. til at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið. Tilboð eru fingin upp á arbeiðini.

Arbeiðið við at taka verandi hitaskipan úr bygningunum og gera arbeiðini liðug má gerast, tá fjarnitanetið er útbygt soleiðis, at tað er í nánd av bygningunum og er klárt til at kunna veita hita til teirra. Av hesi orsøk eydnaðist í 2022 bert at nýta kr. 1.711.760 av játtaða peninginum fyri 2022. Til 28.03.2023 vóru av játtanini frá 2022 harumframt brúktar kr. 217.800. Írestandi arbeiðini verða framd, so hvørt fjarhitanetið kemur fram til og kann veita hita til bygningarnar.

Hinvegin er fjarhitanetið longu nærhendis teimum bygningunum, sum mælt verður til at nýta játtan fyri 2023 at umleggja og binda í, soleiðis at tað til hesar bygningar ikki er neyðugt at bíða, men at arbeiðið kann fara í gongd sum skjótast.

Um býráðið ynskir at íbinda allar teir kommunalu bygningar í fjarhitanetið, sum liggja á leiðini ella nærhendis fjarhitanetinum, mælir fyrisitingin til, at omanfyri nevndu bygningar verða íbundnir, hóast útroknaða afturgjaldstíðin er lutfalsliga long.

Aðrar verkætlanir, sum møguliga kundu verið fíggjaðar í 2023, eru av ymiskum orsøkum ikki enn á einum búningarstigi, har kostnaðurin er kendur, ella har til ber at seta tær í gongd.

Tekniska fyrisiting er biðin um at arbeiða við, hvussu Eysturskúlin og nærhendis bygningar kunnu verða umlagdir til fjarhita ella grøna orku.

Fyrisitingin hevur fyribils kannað, um møgulig útbygging av sjóhitaskipanini við Strond til at nøkta orkutørvin hjá røktarheiminum Láargarður og býlinginum Tórsbyrgi skynsamt kundi fevnt um Eysturskúlan, Tjarnargarð og møguligar aðrar kommunalar bygningnar í Eysturbýnum. Ein stutt kanning av hesum bendir á, at aðrar loysnir tekniskt, fíggjarliga og frá einum heildarsjónarhorni høvdu verið meiri skynsamar.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið omanfyri.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:** Ein meiriluti, Bjørg Dam, Annfinn Brekkstein og Súna Mørk, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Elsa Berg, mælir til, at til næsta fund kemur umsitingin við einum status av Eysturskúlanum, herundir umvælingartørv og møguligar grønar orkuloysnir.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við at fjarhiti verður lagdur til Ellisheimið, Dagstovnin við Løkjatún og Dansifrøi og játta kr. 2 mió. til endamálið.

Eisini samtykt at biðja umsitingina koma við uppskoti um, hvørjir aðrir stovnar kunnu leggja um til alternativa orku og at biðja umsitingina koma við yvirliti yvir $Co^2$ útláti og fíggjarligar avleiðingar síðani umleggingarnar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 100/23 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sjósavnið á Argjum, matr. nr. 56as, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.04.2023 | 52/23 | 18/00853-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 100/23 | 18/00853-3 |

**Upprunin til málið**
Nú arbeiðið við ætlanunum um Sjósavnið á Argjum av álvara er tikið upp aftur, er tíðin búgvin at viðgera ætlanina í mun til byggisamtyktina fyri økið.

**Lýsing av málinum**
Grunnurin Føroya Sjósavn hevur latið gjørt ætlan fyri nýtt sjósavn á Rættargøtu á Argjum, sí skjal *Føroya Sjósavn,* og er komið nakað ávegis við at fáa fígging til vega – herímillum við tilsøgn um stuðul frá Tórshavnar kommunu, sí mál *Føroya Sjósavn: Umsókn um eykajáttan 2017 í sambandi við verkætlanina "Nýtt Sjósavn".*

Staðsetingin móti sjóvarmálanum sunnanfyri Sandagerð er væl hóskandi, og til ber at fáa gott samspæl millum Sjósavnið, sjógvin og náttúruna.

Sjálvur bygningurin hevur eitt ovalt skap, og er skipaður kring eitt stórt opið kar í miðjuni. Staðsetingin er sera sjónlig, bæði frá landi og frá sjógvi, og tí hevur man í sniðgevingini av bygninginum lagt dent á, at bygningurin liggur væl í lendinum og økinum, og gert eitt sermerki.

Bygningurin er uml. 1700 $m^2$ til víddar, og 8 m høgur – umsøkjari kunnar um, at hægsta punkt á tekjuni er uml. miðskeiðis á vindeyganum í Argja skúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:

- Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
- Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.

**Uppslýsingar frá umsitingini**
Verkætlanin fer eitt sindur út um ogn kommunurnar móti norðuri. Antin má verkætlanin tillagast, ella má avtala fáast í lag við eigaran av lendinum. Kanna verður, hvør besta loysnin er, og verður byggisamtyktar økið møguliga tillaga nakað í mun til endaligu loysnina. Talan er um reyða økið á viðhefta kortskjali *Øki út um mark.*

Grunnurin fyri Føroya Sjósavn hevur lagt ætlanina fram fyri grannum á fundi 12. Februar 2023, og er fundarnotat at síggja í skjali *Re_Fundarfrásøgn frá grannafundi í smb. við nýtt sjósavn*. Broytingin av byggisamtyktini skal leggjast fram smb. vanligum mannagongdum.

Í framløgunum framgongur, at matr. nr. 82, ið er privat ogn, er partur av økinum til nýggja Sjósavnið. Ognin er tískil partur av serstøku byggisamtyktini, men er neyðugt at fáa avtalu í lag við eigaran um hetta. Sjósavnið hevur átikið sær at samskifta við eigaran um ognina og tískil hevur Tórshavnar kommuna ikki enn verið í sambandi við eigaran. Í sambandi við hoyring av broytingini í byggisamtyktini verður serskild serskild kunning send eigaranum. Matrikkulin er merktur á kortskjalinum *Øki út um mark,* og verður økið møguliga tillaga í mun til viðmerkingarnar frá eigaranum.

Økið er fevnt av náttúrufriðingarlógini, og serstaka byggisamtyktin er treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 56as, Argir í smb. við ætlanir um sjósavn. Frá D1 til D3,* journal nr. 23/01529.
  Økið, ið ætlanin er at byggja Sjósavnið á, verður broytt frá D1 øki til D3 øki. Útstykking í D3 øki verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.
- *Føroya Sjósavn: Umsókn um eykajáttan 2017 í sambandi við verkætlanina "Nýtt Sjósavn"*, journal 17/00792.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Føroya Sjósavn – ætlan,* jnr. 18/00853-10
- *Re_Fundarfrásøgn frá grannafundi í smb. við nýtt sjósavn,* jnr. 18/00853-11.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Sjósavnið á Argjum,* jnr. 18/00853-12.
- *Øki út um  mark,* jnr. 18/00853-13.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja:

- uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Sjósavnið á Argjum, treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og avtalu við eigara av matr. nr. 82.
- at heimila umsitingini at tillaga øki, um neyðugt, smb. kortskjali *út um mark.*
- at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

## 101/23 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 72/22 | 22/00463-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 28.03.2022 | 3/22 | 22/00463-1 |
| 3 Havnanevndin | 05.04.2022 | 13/22 | 22/00463-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 144/22 | 22/00463-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 159/22 | 22/00463-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2022 | 222/22 | 22/00463-1 |
| 7 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 289/22 | 22/00463-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.04.2023 | 53/23 | 22/00463-1 |
| 9 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 101/23 | 22/00463-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Flestu bygdirnar í kommununi hava sína egnu serstøku byggisamtykt, men Kollafjørður kemur undir ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini og mett verður, at tað skal hon framhaldandi gera, av tí at talan er um størstu bygdina í kommununi, ið er meira býarkend, og nær høvuðsstaðnum. Soleiðis verður tað í hesum málinum einans býarskipanin (kortið), ið verður endurskoðað, og ikki sjálvar ásetingarnar í byggisamtyktini. Ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini vórðu endurskoðaðar í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.*

**Lýsing av málinum**
Tær flestu broytingarnar í býarskipanini í Kollafirði eru tillagingar, soleiðis at byggisamtykt og matrikulmørk fylgjast. Aðrar broytingar eru t.d. broyting av C3 miðstaðaøkinum við bátahylin við Sjógv, ið verður mælt til at broyta til B2 havnaøki, E neystaøki og A1 sethúsaøki, av tí at hetta verður mett at hóska seg betur til økið. Somuleiðis verður mælt til, at C1 miðstaðarøkið í Homrum verður broytt til eitt A1 øki, av tí at sethús eru í øllum hesum økinum.

Allar broytingar, og stutt viðmerking til broytingarnar, eru at síggja í skjalinum *Kollafjørður – broytingar*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kollafjørður er fevndur av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir, journal nr. 17/02748.*
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum**
Broytingarnar fyri havnaøkini eru gjørdar í samráð við Havnaskrivstovuna.

**Skjøl**
- *Kollafjørður – broytingar,* journal nr. 22/00463-3.
- *Kollafjørður – áðrenn broyting,* journal nr. 22/00463-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð smb. skjalinum *Kollafjørður – broytingar,* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ynski, at víðka neystaøkið úteftir undir matr. nr. 329 og at fáa samtyktu broytingina við matr. nr. 47 við, umframt at broyta part av matr. nr. 257c, sunnan fyri verandi havnaøki, til vinnuøki.

**Kollafjarðarnevndin 28. mars 2022:**
Staðbundna nevndin mælir til fylgjandi tillagingar:
- Broyting 1 í B2 øki: Nevndin ynskir ikki, at økið verður broytt til havnaøki og ynskir at økið verður eitt trivnaðarøki.
- Broyting 4 í B2 øki: Nevndin mælir til, at økið verður broytt til eitt vinnuøki, umframt at vinnuøkið verður víðkað til kaikantin.
- Taka undir við at broyta part av matr. nr. 257c til vinnuøki og víðkast til at fevna um økið, ið ikki er asfalterað.
- Nevndin tekur undir við hinum broytingunum.

**Ískoyti frá Tórshavnar havn**
Víst verður til samtyktina í Byggi- og býarskipanarnevndini hin 7.mars 2022 um ynski at broyta part av matr. 257 C til vinnuøki (økið sunnanfyri asfalteraða og innhegnaða økið).
Økið er partur av havnaøkinum á Oyrareingjum. Havnaøkið minkar sostatt við umleið eini helvt og missir munandi av virði sínum sum havn, um nevndi parturin av økinum verður broyttur til vinnuøki.

Hóast hesin parturin av havnaøkinum enn ikki hevur verið brúktur til havnarrelaterað virksemi, hevur tað tó sera stóran týdning fyri Tórshavnar havn sum ein framtíðar tilfeingisdepil í Norðurhøvum at hava eitt slíkt økið, ið er staðsett beint við eina djúphavn við góðari stórari rampu, tøkt at kunna bjóða fram til shippingvinnu av ymsum slag.

Tað er umráðandi fyri eina havn at altíð at hava økir tøk til virksemi, ið hevur tørv á flutningi umvegis bryggjukant. Alt havnaaøkið í Tórshavn er í løtuni avsett og í nýtslu til verandi virksemi hjá verandi kundum. Á Sundi er “gamla” havnaøkið næst við bryggjuni í nýtslu alt sum tað er, meðan helvtin av nýggju útfyllingini

eystureftir á Sundi er útleigað. Sostatt eru nærum eingi tøk øki eftir á verandi havnaøkjum til at kunna viðka um virksemi, um og tá ið tørvur verður á tí, t.d. sum komandi tilfeingisdepil.

Strandalinjan í Tórshavnar kommunu, har ið til ber at staðseta góð havnaløg, er avmarkað, og tí er tað umráðandi, at fáu havnaløgini verða nýtt skynsamt og einans til virksemi, ið hevur tørv á flutningi umvegis bryggjukant ella sambandinum við sjógvin. Onnur vinna, ið ikki hevur hendan tørvin, eigur heldur at verða staðsett aðrastaðni enn við havnaløgini.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir havnanevndini til at taka undir við upprunauppskotinum um endurskoðaða byggisamtykt sambært skjalinum *Kollafjørður – broytingar*, men mælir samstundis havnanevndini frá, at partur av matr. nr. 257c (økið sunnanfyri asfalteraða og innhegnaða økið) verður broytt til vinnuøki.

**Havnanevndin 05. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting at verandi havnaøki verður varðveitt sum havnaøki við matr.nr.257c.

**Ískoyti:**
Í smb. við politisku viðgerðina av uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, eru ymiskar broytingar samtyktar.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 7. mars 2022 varð samtykt at:
1. Víðka neystaøkið úteftir undir matr. nr. 329.
2. Fáa samtyktu broytingina við matr. nr. 47 við.
3. Broyta part av matr. nr. 257c sunnan fyri verandi havnaøki til vinnuøki.

Á fundi í Kollafjarðanevndini hin 28. mars 2022 varð mælt til, at:
4. Broyting 1 í B2 økinum (bátahylurin í Líðini) verður varðveitt sum eitt trivnaðarøki og ikki broytt til eitt B2 havnaøki.
5. Broyting 4 í B2 økinum verður broytt til eitt vinnuøki ístaðin fyri havnaøki, og at vinnuøkið verður víðkað yvir til kaikantin.
6. Taka undir við at broyta part av matr. nr. 257c til vinnuøki og víðkast til at fevna um økið, ið ikki er asfalterað.

Á fundi í Havnanevndini hin 5. apríl 2022 varð samtykt at:
7. Verandi havnaøki við matr. nr. 257c verður varðveitt sum havnaøki.

Til hetta hevur umsitingin hesar viðmeringar:
Ad. 1. Tikið verður undir við hesi viðmerking.
Ad. 4. Tikið verður undir við hesi viðmerking, men mælt verður til, at økið verður eitt C1 øki ístaðin fyri C3 øki. Munurin á ásetingunum í teimum báðum økjunum er, at C1 er lagt til miðstaðabygging og C3 er lagt til miðstaðabygging, skúlar og íbúðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja punkt 1, 2 og 4, at nevndin tekur støðu til punkt 3, 5, 6 og 7 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir tilmælinum frá umsitingini, punkt 1, 2, og 4, og við punkt 7.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð hevur ligið til almenna hoyring frá 11. august 2022 til 22. september 2022. Í tí sambandi komu 6 hoyringsskriv, og eru hesi viðgjørd niðanfyri.

Trý av hoyringsskrivunum snúgva seg um sethús/matriklar, ið liggja í D1 fríøkjum, og verða hesi viðgjørd saman. Talan er um viðheftu skriv *Viðmerking - matr. nr. 25, Viðmerking – matr. nr. 199f* og *Viðmerking – matr. nr. 211b.* Niðanfyri er ein samandráttur av hesum, og viðmerkingar frá umsitingini.

**Matr. nr. 25**
Í 2019 søkti táverandi eigari av matr. nr. 25 í Kollafirði um at broyta byggisamtyktina fyri matrikulin frá at vera D1 øki til A1 øki.

Umsóknin var grundað á ynskið um at umvæla og byggja ognina út. Húsini vóru lág, ov lítil til eina fastbúgvandi familju og eingin vegur var til húsini.

Umsóknin varð ikki gingin á møti við tí grundgeving, at ynskið var at varðveita fríøki og at verja gomul bygdarløg í ávísan mun. Í málslýsingini varð víst á strukturin á byggisamtyktini í økinum, har grønir geirar eru planlagdir ímillum og oman fyri bústaðarøki. Endamálið við D1 geirunum var at stýra bygging til tess at fremja heildarmyndina og grannalagskensluna í Kollafirði. Húsini eru frá 19'indu øld og liggja í einum serstøkum gomlum bygdarlagi – tó ognin ikki er friðað.

Síðani umsóknina um broyting av byggisamtyktini í 2019, er ognin seld, og nú uppskot hevur ligið til hoyringar um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, ynskir nýggi eigarin av ognini, at umsóknin frá 2019 verður endurviðgjørd.

**Matr. nr. 199f**
- Ynskja at matr. nr. 199f verður broyttur frá D1 øki til A1 øki.
- Húsini eru í ivasomum standi, óheppið innrættað og ov lítil til familjuna upp á 5.
- Eru fegin um grøna økið húsini standa í og vistu av hesum tá tey fyri 2 árum síðani keyptu húsini, men hava fyri neyðini at fáa lagt eitt lítið sindur afturat húsunum.
- Viðmerkja, at talan er um sama matrikul, sum royndarholið hjá Jarfeingi og Tórshavnar kommuna er grava á, í smb. við heitu kelduna.
- Hava spurt seg fyri um nakar veit um friðingina, hvat liggur aftanfyri ella hvussu hon er farin fram, men eingin kennir til hana og eingin kennir til nakra hoyring. Man hevur smoygt eina friðing niðuryvir einstaklingar, uttan at tey hava vitað av tí.
- Ongar greiðar grundgevingar fyri, hví økið varð broytt.
- Víst verður á, at í øðrum tílíkum D1 økjum í Kollafirði, tykist tað sum at endamálið hevur verið, at binda saman traðir við bygdavegin. Hinir líkandi D1 geirarnir eru tó minni, enn geirin við matr. nr. 199f. Um man minkaði D1 geiran við at taka matr. nr. 199f (og 200) úr, so varð endamálið við geiranum framvegis rokkið, og fór at líkjast meira hinum líknandi D1 geirunum.
- Sær út sum, at talan hevur verið um ein feil, tá økið er lagt til D1 øki.

**Matr. nr. 211b**
- Ynskir at parturin av matr. nr. 211b, sum er umráðispartur D1, verður broyttur til A1. Er ikki áhugaður í at partur av stykkinum skal vera til almenning og metir ikki, at tað eigur at vera friðað.
- Um kommunan ikki er einig í hesum, er hon vælkomin at keypa økið.

**Viðmerkingar frá umsitingini**
Eins og nevnt varð í fyrru viðgerð av umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 25, so eru umrøddu grønu geirarnar, sum ognirnar matr. nr. 25, 199f og 211b allar eru partar av, ein gjøgnumgangandi strukturur í Kollafirði. Teir stava allir frá áðrenn kommunurnar vórðu lagdar saman, og í skjølunum sæst, at ætlanin við teimum er, at varðveita grannaløgini og bygdaidentitetin, og atskilja grannaløgini við fríøkjum ímillum. Tað at D1 økini eru løgd oman á verandi sethús leggur nakrar óhepnar bindingar á ognirnar, men fremja tann ynskta býarskipanarliga strukturin, ið er við til at varðveita bygdadámin í Kollafirði.

Um sethús liggja í D1 øki verður tað loyvt teimum at viðlíkhalda húsini og gera neyðugar ábøtur, men loyvt verður ikki, at vaksa um rúmdina á húsunum. Tað eru fleiri dømi um sethús, ið liggja í D1 øki í Tórshavnar kommunu – uml. 8 í Kollafirði og Signabø.

Trý av hoyringsskrivunum snúgva seg um havnaøki, og verða hesi viðgjørd saman. Talan er um viðheftu skriv *Viðmerking – Kollafjarðarnevndin, Viðmerking – Páll Danielsen* og *Viðmerking – matr. nr. 296.* Niðanfyri er ein samandráttur av hesum, og viðmerkingar frá umsitingini.

**Kollafjarðarnevndin**

- Mótmælir harðliga byggisamtyktini.
- Kollfjarðarnevndin hevur seinastu tvey árini víst á óskili og óruddi á matrikklunum 257a á Oyrareingjum og partar av 230a, sum Tórshavnar havn varðar av. Økini hava verið órøkt í fleiri ár og ikki verið brúkt til sørt annað enn órudd og óskil. Hava skotið upp, at hesi økið verða gjørd til vinnuøki.
- Serliga matr. nr. 257c á Oyrareingjum hevur stórt potentiali og upplagt til vinnuvirksemi. Økið er mitt í landinum, planerað, tætt við havnavirksemi og stórt til víddar.
- Partur av matr. nr. 230a er beinleiðis vandamikið at ferðast á, tí órudd, bilar og konteynarar eru allastaðni. Tilvildarlig brúka økið til teirra fyrimun uttan treytir.
- Upprunaliga vóru hesi øki vinnuøki, men vóru broytt til havnaøki eftir kommunusamanleggingina. Tórshavnar havn hevur ongantíð gagnnýtt, skipað ella røkta økini.
- Kollfjarðarnevndin varð tikin upp á ráð, nú byggisamtyktin skuldi endurskoðast, og víst var á viðurskiftini við havnaøkjunum, men nú byggisamtyktin liggur til hoyringar, so eru økini varðveitt sum havnaøki.
- Tað er komið fram, at orsøkin til at tilmælið frá Kollfjarðarnevndini ikki er gingið á møti, er tí at umsókn er komin til Tórshavnar havn um at brúka økið til havnavirksemi. Kollfjarðanevndin undrast staðiliga á ein slík umsókn kemur í síðstu løtu og kann hava so stóra ávirkan, at økið verður varðveitt sum havnaøki, ímóti tilmælinum hjá staðbundnu nevndini, sum umboða yvir 1000 fólk í økinum.

**Páll Danielsen**

- Spurnatekin verður sett við hvussu kommunan kann loyva, at bygt verður útum mark í tí gomlu byggisamtyktini. Hetta tykist sum ein vánalig roynd at dekka yvir feilir sum eru gjørdir fyri nógvum árum síðani. "Tað kemur til tankar at hetta er ein strategi sum er løgd við vilja fyri at spakuliga yvirtaka allan fjørðin til havnaøki og samstundis er hetta við til at reka fólk av bygd vegna larm." Víst verður til broyting 1 í B1 økjum og broyting 4 í B2 økjum.
- Tað letur til at kommunan roynir at krógva sínar egnu feilir við at taka tey økini sum eru farin útum mark við uppí ta nýggju samtyktina.
- Broyting 4 fer at at økja um larmin frá skipum og virksemi á fjørðinum. Hetta er vánaligt fyri trivnaðin hjá teimum, sum búgva á fjørðinum.
- Metir tað vera positivt við broytingum av byggisamtyktini til neystagrundir og sethúsaøkir á Signabø og á fjørðinum sum heild, men tað nyttar lítið tá eingin vil vera har grundað á nógva larmin frá ídnaðarøkjunum.
- Havnaøkið hevur ikki verið røkta og skipað á ein hátt sum er til gleði ella nyttu og tí verður mett, at Tórshavnar havn er óbúgvin at taka sær av økinum.
- Tekur undir viðmerkingunum frá Kollafjarðanevndini um, at økið, ið ikki verður røktað av Tórshavnar havn (økið uttanfyri hegnið), verður broytt til vinnuøki.

**Matr. nr. 296**

- B1 havnaøkið suðuri á Oyrini á Signabø eigur at verða avtikið.
- Vinnuøkið varð staðsett fyri yvir hundrað árum síðani, og síðani eru fleiri onnur stór og betur egnaði vinnuøkir komin í Kollafirði.

- Økið hevur einki viðri sum vinnuøkið – ikki planerað (sum so), einki vatn, eingin el-veiting, eingin brúkiligur infrastrukturur og bert ein grúsvegur, sum bóndin eigur.
- Náttúruvakurt øki og søguligar leivdir frá tveimum hvalastøðum, sum vóru til í tjúgundu øld.
- Vegirnir á Signabø eru smalir og óegnaðir til stór og áhaldandi koyrandi vinnutól, um virksemi skuldi tikið seg upp á Oyruni.
- Økið hevur í fleiri ár verið brúkt av bóndanum á Signabø, og er eftirhondini eisini vorið ein integreraður partur av arbeiðinum hjá bóndanum. Í øðrum førum grundgevur kommunan víðkanir av byggisamtyktini við, at hon er í tráð við "veruliga virksemið" í økinum – tí eigur man eisini at kunnu minka/avtaka økir, har ið einki veruligt virksemi (samsvarandi byggisamtyktini) hevur verið í longri tíð.

**Viðmerkingar frá umsitingini**
Tað at staðseta bústaðarøki og havnaøki, við virksemi, ið hava høga ljóðdálking, er yvirskipað ikki skynsam býarskipan. Tá nýggj havnaøki/vinnuøki verða skipað og staðsett, eru ymiskar vegleiðingar, ið verða fylgdar, t.d. vegleiðing um umhvørvisflokkin, ið vegleiðir um, hvør hóskandi frástøða er millum ávíst vinnuvirksemi og bústaðir.

Tá kemur til verandi býir og bygdir, og virksemi í hesum, er tað tó ikki altíð møguligt at fylgja vegleiðingunum. Natúrliga dynamiska býarmenningin gevur ein strukturur, har vinnan og bústaðarøkini vaksa saman, og er hetta ein gongd, ið sæst aftur í nógvum býum og bygdum.

Havnaøkið eru orkukrevandi at útvega og tí verður tað mett skynsamt, at lata tey øki, ið eru egnað til havnavirksemi, at verða útløgd til hetta.

Tá havnaøkið – og býarøki annars, verða víðkað, er rætta mannagongdin tann, at byggisamtyktin verður broytt áðrenn økini verða inntikin, og er hetta eisini ein mannagond, ið vanliga verður fylgd. Í partum av havnaøkjunum í Kollafirði og á Oyrareingjum er hetta tó ikki støðan, men nú økini eru útbygd og nýtt til havnaendamál, eigur byggisamtyktin fyri økini at vera broytt, soleiðis at hon samsvarar við virksemið.

Í mun til hvussu økið verður nýtt og røkta, so verður tað ikki mett vera eitt byggisamtyktarmál, men tað er sjálvsagt óheppið fyri økið og býarmyndina at kommunal øki liggja í órøkt.

Viðvíkjandi havnaøkinum suðuri á Oyrini á Signabø, so tekur umsitingin undir við, at havnaøkið eigur at vera avtikið. Har er í dag ikki etablerað havnavirksemi í økinum, og tað verður ikki mett hóskandi, at draga ferðslu og virksemi, sum eitt havnaøki viðførir, gjøgnum Signabø og eftir grúsvegnum. Umsitingin hevur somuleiðis umrøtt málið við Havnaskrivstovuna, sum vísir á, at ongar framtíðarætlanir liggja í kortunum at byggja havnalag í hesum økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð við teirri broyting, at B1 havnaøki suðuri á Oyrini á Signabø verður avtikið, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 15. desember 2022 varð samtykt at avtaka B1 havnaøkið suðuri á Oyrini á Signabø. Broytingin av byggisamtyktini fyri B1 øki á Oyrini hevur ligið til almenna hoyring frá 10. januar 2023 til 21. februar 2023, og í tí sambandi er ein viðmerking komin frá Tjóðsavninum. Í viðmerkingini verður ført fram at:

- Tjóðsavnið tekur undir við, at B1 havnaøkið verður avtikið, men ístaðin fyri at leggja økið sum 4. grundumráði, sum er ætlað landbúnaði, so mælir Tjóðsavnið til at leggja økið sum D1 frílendi.

- Tjóðsavnið ger vart við, at leivdir av gomlu hvalastøðini á Signabø eru í lendinum, eins og aðrar leivdir eru fram við ánni oman móti ósanum. Hvalastøðin, ið varð bygd í 1902, var ein av teimum fyrstu, ið vórðu bygdar í Føroyum. Støðin var virkin til 1912 og hevur í dag ein søguligan týdning sum ídnaðarminni og fyri samleikan á staðnum. Staðsetingin í náttúrumhvørvinum fram við ánni niðri við ósan gevur staðnum ein serligan dám.
- Tjóðsavnið metir, at ásetingarnar fyri 4. grundumráði hava við sær vanda fyri landbúnaðarvelting við stórum maskinum og bygging av landbúnaðarbygningum. Um økið verður lagt sum D1 frílendi, so gerst øki betur vart og betur atkomuligt.

Leivdirnar av hvalastøðini eru ikki friðaðar við lóg.

Viðmerkingin hjá Tjóðsavninum snýr seg einans um B1 økið á Signabø, men málið um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð fevnir um fleiri aðrar broytingar. Umsitingin tekur undir við viðmerkingini frá Tjóðsavninum, men fyri at tilgongdin við hinum broytingunum í endurskoðanini kunnu halda áfram, verður mælt til at stovna nýtt serstakt mál viðv. viðmerkingini hjá Tjóðsavninum. Málið hevur fingið journal nr. 23/01978, *Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 320a, Kollafjørður*.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í endurskoðanini av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, sum samtykt í býráðnum 15. desember 2022, og at viðmerkingin hjá Tjóðsavninum verður viðgjørd í máli 23/01978, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 102/23 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 56as, Argir í smb. við ætlanir um sjósavn. Frá D1 til D3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.04.2023 | 51/23 | 23/01529-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 102/23 | 23/01529-2 |

**Upprunin til málið**
Nú arbeiðið við ætlanunum um Sjósavnið á Argjum av álvara er tikið upp aftur, er tíðin búgvin at viðgera ætlanina í mun til byggisamtyktina fyri økið.

**Lýsing av málinum**
Nýggja ætlanin hjá Føroya Sjósavni liggur á sama staði, sum Sjósavnið hevur ligið í nógv ár – á Rættargøtu á Argjum, oman móti Sandagerði. Staðsetingin er hóskandi, nær sjóvarmálanum, og Tórshavnar kommuna tekur undir við virkseminum, sum er eitt týðandi íkast til býin og føroyska samfelagið annars, sum depil fyri náttúruskúla og sjósavn, ið hugtekur bæði børn og vaksin. Í mars 2023 gav Tórshavnar kommuna Grunninum Føroya Sjósavni tilsøgn um íløgustuðul til nýggja Sjósavnið á Argjum, sí mál *Føroya Sjósavn: Umsókn um eykajáttan 2017 í sambandi við verkætlanina "Nýtt Sjósavn".*

Økið liggur sum D1 øki, sum í síni heild verður lagt til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Hóast tað við serstakari byggisamtykt ber til at byggja í D1 øki, sum er í samsvari við ásetingarnar fyri øki, so verður tað í hesum føri mett vera mest hóskandi at broyta økið til eitt D3 øki.

D1 øki eru frílendi, sum man, við nøkrum fáum undantøkum, ikki kann byggja á, og hesum ynskir man at halda fast í.

Økið har Sjósavnið liggur, og framhaldandi fer at liggja, er ein asfaltfløta omaná eini uppfylling av gróti. Økið omanfyri, við gamla skúlan, liggur sum D3 øki, sum er ætlað stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt, og tað verður mett hóskandi at taka økið til Sjósavnið við undir hesa áseting.

Økið, ið verður broytt frá D1 øki til D3 øki er áleið 9000 $m^2$, og svarar hetta til kravda byggistigið til ætlaðu bygningina, umframt verandi bygging í D3 økinum. Umframt at broyta byggisamtyktina til D3 øki, skal serstøk byggisamtykt gerast, ið skipar bygningina neyvari á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.
- Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.

Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
- Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
- Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Verkætlanin fer eitt sindur út um ogn kommunurnar móti norðuri. Antin má verkætlanin tillagast, ella má avtala fáast í lag við eigaran av lendinum. Kanna verður, hvør besta loysnin er, og verður byggisamtyktar økið møguliga tillaga nakað í mun til endaligu loysnina. Talan er um reyða økið á viðhefta kortskjali *Øki út um mark.*

Matr. nr. 82 er privat ogn. Ætlanin hjá Sjósavninum gongur inn yvir privata matrikkulin, og tí hevur Sjósavnið átikið sær at samskifta við eigaran um ognina. Tórshavnar kommuna hevur tískil ikki enn verið í sambandi við eigaran. Í sambandi við hoyring av broytingini í byggisamtyktini verður serskild serskild kunning send eigaranum. Matrikkulin er merktur á kortskjalinum *Øki út um mark,* og verður økið møguliga tillaga í mun til viðmerkingarnar frá eigaranum.

Grunnurin fyri Føroya Sjósavn hevur lagt ætlanina fram fyri grannum á fundi 12.02.23, og er fundarnotat at síggja í skjali Re_Fundarfrásøgn frá gannafundi í smb. við nýtt sjósavn. Broytingin av byggisamtyktini skal leggjast fram smb. vanligum mannagongdum.

Økið er fevnt av náttúrufriðingarlógini, og broytingin av byggisamtyktini er treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

Av tí at man fer undir at gera broytingar í D3 økinum við skúlan á Argjum, verður mælt til, at man um somu leið rættar upp uppá byggisamtyktarlinjurnar fyri D3 øki, soleiðis at tær fylgja matrikulmørkunum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sjósavnið á Argjum, matr. nr. 56as, Argir,* journal nr. 18/00853. Útstykking í D3 øki verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, og tískil skal ein serstøk byggisamtykt gerast, um loyvi skal kunna gevast til at byggja Sjósavnið. Serstaka byggisamtyktin lýsir neyvari, hvussu økið og byggingin verður skipað.
- *Føroya Sjósavn: Umsókn um eykajáttan 2017 í sambandi við verkætlanina "Nýtt Sjósavn"*, journal 17/00792.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Áðrenn broyting,* journal nr. 23/01529-3.
- *Eftir broyting,* journal nr. 23/01529-3.
- *Re_Fundarfrásøgn frá gannafundi í smb. við nýtt sjósavn*, jnr. 23/01529-5
- *Øki út um mark,* jnr. 23/01529-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið til nýtt Sjósavn á Argjum frá D1 øki til D3 øki samb. kortskjali *Eftir broyting,* treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.
- at heimila umsitingini at tillaga øki, um neyðugt, smb. kortskjali *út um mark.*
- at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 103/23 Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 320a, Kollafjørður. Frá B1 til D1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.04.2023 | 54/23 | 23/01978-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 103/23 | 23/01978-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð hevur ligið til almenna hoyring, sí mál *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð*, hevur Tjóðsavnið sent áheitan til Tórshavnar kommunu um at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 320a suðuri á Oyrini á Signabø til eitt D1 øki ístaðin fyri 4. Grundumráði.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna hevði lagt uppskot fram um at avtaka B1 vinnuøki á matr. nr. 320a, Kollafjørður. Tjóðsavnið tekur undir við, at B1 økið verður avtikið, men heitir á Tórshavnar kommunu um at leggja økið sum D1 øki ístaðin. Orsøkin til áheitanina er, at:

- Levdir av gomlu hvalastøðini á Signabø eru í lendinum, eins og aðrar leivdir eru fram við ánni oman móti ósanum. Hvalastøðin, ið varð bygd í 1902, var ein av teimum fyrstu, ið vóru bygdar í Føroyum. Støðin var virkin til 1912 og hevur í dag ein søguligan týdning sum ídnaðarminni og fyri samleikan á staðnum.
- Ein áseting sum 4. Grundumráði kann hava við sær vanda fyri landbúnaðarvelting við stórum maskinum og bygging av landbúnaðarbygningum.
- At leggja økið sum D1 øki gevur betri møguleika fyri at gera økið atkomuligt.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu tekur undir við Tjóðsavninum, og metir tað vera hóskandi at leggja økið sum D1 øki, soleiðis at tað verður vart fyri teimum inntrivum, sum landbúnaður kann hava við sær.

B1 økið, ið verður avtikið, sæst á kortskjali *B1.* Uppskot til ítøkiliga hvat øki eigur at verða lagt sum D1 øki, verður gjørt í samráð við Tjóðsavnið.

Talan er um búnaðarjørð, so uppskotið verður sent Búnaðarstovuni til viðmerkingar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst, skrivstovur og goymslur í sambandi við skipagreiðslu og vøruflutning og tílíkt, og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Broytingin av byggisamtyktini fyri B1 øki á Signabø byrjaði sum partur av máli um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, sí mál *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð.* Av tí at fleiri broytingar eru í tí málinum, og viðmerkingin frá Tjóðsavninum einans snýr seg um B1 økið á Signabø, so er nýtt mál upprætta hesum viðvíkjandi, soleiðis at arbeiðið at fremja hinar broytingarnar í Kollafirði kann halda áfram.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð,* journal nr. 22/00463.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Braev_ut-TSF_t_Torshavnar_k-Hoyringssvar_broyting_byggisamtykt_Signaboe.pdf,* journal nr. 23/01978-2.
- *B1,* journal nr. 23/01978-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, har hvalastøðin á Signabø er, til D1 øki í samráði við Tjóðsavni, treytað av tilsøgn frá Búnaðarstovuni, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 104/23 Vatnbyrging í Kollafirði - 2001-2548

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 18/23 | 14/00163-85 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 106/23 | 14/00163-85 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 104/23 | 14/00163-85 |

**Upprunin til málið**
Málið varð fyrstu ferð lagt fyri teknisku nevnd 2. november 2006 og síðani fyri avvarðandi nevndir. Herniðanfyri er avrit av málslýsingini:

**2001-2548/68 SG (sí eisini mál nr. 2008-1341)**

**Viðv. vatnbyrging í Kollafirði**.

Projektering av nevndu byrging er komin so væl áleiðis, at arbeiðið uppá atkomuveg v.m. er um at vera klárt at bjóða út.

Tíðar- og kostnaðarætlan er gjørd, og samlaður kostnaður pr. 24.10.2006 fyri fyribilsbyrging, atkomuveg, høvuðsbyrging og burturbeining av fyribilsbyrging er kr. 28.127.092.

Byrgingin kann takast í brúk á sumri 2009.

Av hesum er fyribilsbyrgingin mett til kr. 858.428, atkomuvegur niðan til byrgingina er mettur til kr. 8.153.952, og rør og kaðalføringar í nevnda vegi er mett til kr. 1.957.929.

Orsakað dálking av Botná í byggitíðini er neyðugt við eini fyribils byrging, ið verður løgd oman fyri arbeiðsøkið, og verður hetta fyrsta byggistig.

Vegna sera trupul vatnviðurskifti í Kollafirði verður Botná, sum ein neyðloysn, brúkt til drekkivatn í dag.

**Tilmæli:**
Leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla í fyrsta lagi til, at fyribils byrging og atkomuvegur verða framd í 2007 og at fíggja arbeiðið av íløgum fyri vatn. Í øðrum lagi verður mælt til einans at lata gera fyribils byrging í 2007 fíggjað av íløgum 2007.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á vatn- og gøtuljósdeildini, býarverkfrøðinginum og tekniska stjóranum at lata gera fyribils byrging og atkomuveg álj. uml.. 11 mió. kr. at fíggja av íløgum í 2007 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1.000.000 til fyribilsbyrging at fíggja av íløgum 2007.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Orsakað av at eingi útlit eru fyri íløgum næstu trý árini í vatnveitingina í Kollafirði, verður her mælt til at játta pening av íløguætlanini fyri 2008.

1. Nýtt vatnreinsiverk kr. 1,000 mió
2. Keyp av lendi kr. 1,500 mió.

3. Fyribilsbyrging kr. 0,850 mió. (varð játtað 16. nov. 2006)

Í alt kr. 3,350 mió.

Í dag verður vatn tikið úr trimum áum, sum serliga á vetri geva stórar trupulleikar, orsakað frost og krapa. Eisini er vatnið sera skitið eftir áarføri og líkur ikki heilsufrøðiligu krøvini. Umsitingin hevur móttikið klagur. Støðan á vatnveitingini í Kollafirði er ikki nøktandi, og er tí umráðandi at fáa eina fyribils vatnbyrging skjótast gjørligt.

Fyri at koma víðari í okkara stremban at fáa eina byrging, mugu ávís krøv frá eigarunum av Ognarmørkini í Todneshaga gangast á møti. Hesi krøv eru m.a. at kommunan ognar sær neyðuga lendið og at øll projektir, sum ávirka hagan, eru liðug og búgvin til viðmerkingar og støðutakan. Víst verður annars til mál nr. 2008-1341/13 í hesum sambandi.

Í løtuni verða uppmálingar av lendi gjørdar av P/F Munin, Føroya Náttúrugripasavn ger árinskanningar og P/F Preben Hansen projekterar. Til hesi endamál var ein mill. kr. játtað, og eru kr. 395.000 tøkar av hesi játtan.

Ein fyribils byrging er mett til kr. 850.000 og keyp av lendi er mett til 54.000 m³ x kr. 27,00 = kr. 1.485.000.

Við vatnverkinum á Velbastað sum fyrimynd, so er nýtt vatnverk í Kollafirði mett til kr. 1,0 mill.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatn- og gøtuljósdeidini mæla til at játta omanfyri nevndu 3,35 mill kr. til keyp av lendi, til gerð av fyribils byrging og nýtt vatnreinsiverk og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. oktober 2008:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 2,35 mill. til verkætlanina afturat verandi játtan.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 65.000,-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6775 | L67001 | Vatnbyrging í Kollafirð | 6775 | LK67005 | Vatnreinsiverk í Havnardali | | Kr. 65.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 392 |
| | Formansins merki: |

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at nevnda upphædd á kr. 65.000,- verður játtað á Løgukarmin fyri Vantreinsiverk í Havnardali LK67005, og at verkætlanin L67001 Vatnbyrging í Kollafirði verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

## 105/23 Fíggjartørvur til vegir og rundkoyringar til Brúnna við Sandá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 30.01.2014 | 4/14 | 14/00800-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2014 | 6/14 | 14/00800-3 |
| 3 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 16/23 | 14/00800-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 105/23 | 14/00800-3 |
| 5 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 105/23 | 14/00800-3 |

**Málslýsing:**

# (sí j. nr. 2006-3283)

# Fíggjartørvur til vegir og rundkoyringar til Brúnna við Sandá

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til mál nr. 2006-3283, er arbeiði at gera vegastubbar og rundkoyringar í sambandi við brúnna um Sandá boðið út. Lisitatión varð hildin 20. januar 2014.

Tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Andrias Berg | 9.728.856,- |
| Articon | 12.485.223,- |
| Hans Wilhelm Lürtzen | 12.494.930,- |
| TG Verk | 13.072.792,- |
| J&K Petersen | 13.662.898,- |

Ráðgevin, bygginevndin og umsitingin hava mælt til at taka av lægsta tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Smærri peningaupphæddir eru í nøkur ár avsett til fyrireiking av brúgv um Sandá, og í íløguætlanini fyri 2013 vóru avsettar ein størri upphædd - kr. 25 mió. Av játtaðu upphæddunum eru í løtuni tøkar kr. 2,227 mió., og á framflutta karminum kr. 31,183 mió. – tilsamans kr. 33,410 mió. Mett var tí, at ikki var neyðugt at avseta írestandi íløgutørvin í 2014, men at hetta verður við í íløguætlanini fyri 2015.

Seinni í ár verður sjálv brúgvin boðin út eisini.

Umsitingin leggur fram skjal viðv. samlaða fíggjartørvinum til vegir og rundkoyringar til Brúnna um Sandá, íroknað ókent, eftirlit, umsiting, mvg o.a. sum verður mett at kostað kr. 12,6 mió. (sí j. nr. 2014-0219/1).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samlaði tøki fíggjarkarmurin á kr. 31.183 mió. verður játtaður til verkætlanina Brúgv um Sandá, L81003, og at arbeiði uppá vegir og rundkoyringar verður fíggjað av hesi játtan, og at restin verður nýtt í 2014 til seinna partin av verkætlanini – brúgvin – tá hendan fer í gongd seinni í ár.

**Tekniska nevnd 30. januar 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena D. á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 30. januar 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta framflutta løgukarmin kr. 31,7 mió. til verkætlanina L81003, brúgv um Sandá.

**Ískoyti**
Verkætlanin er liðug og avhendað kommununi. Eftir á verkætlanarkontuni standa kr. 1.000.

**Fíggjarligar avleiðingar**
Ja

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81003 | Glyvursvegur – Brúgv um Sandá | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | 1.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
| --- | --- | --- |
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin L81003 Glyvursvegur – Brúgv um Sandá – verður lokað, og avlopið á kr. 1.000 verður flutt á løgukarmin LK81999 Vegaverkætlanir, og at málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 106/23 Áheitan frá borgara um at gera vegastrekkið við Dalalíð liðugt (2011-2060)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 42/15 | 14/02182-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 99/15 | 14/02182-8 |
| 3 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 75/15 | 14/02182-8 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 86/15 | 14/02182-8 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 247/15 | 14/02182-8 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 192/15 | 14/02182-8 |
| 7 Tekniska nevnd | 09.01.2018 | 1/18 | 14/02182-8 |
| 8 Tekniska nevnd | 26.11.2019 | 81/19 | 14/02182-8 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 39/20 | 14/02182-8 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 232/20 | 14/02182-8 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 198/20 | 14/02182-8 |
| 12 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 17/23 | 14/02182-8 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 107/23 | 14/02182-8 |
| 14 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 106/23 | 14/02182-8 |

**Málslýsing: (sí eisini mál nr. 2011-2060 og 2000-1640)**
Í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagf. 6. september 2011, vísir borgari á, at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós, og at íbindingin til Marknagilsvegin er óskipað. Ynski er, at Dalalíð verður gjørd liðug.

Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Borgari hevur aftur gjørt vart við at Dalalíð ikki hevur gongubreyt ella gøtuljós og ynskir at fáa dagført vegin nú. Umsitingin hevur svarað í skrivi til borgaran, at farið verður ikki undir arbeiðið at dagføra vegin fyrr enn fígging fyriliggur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig kostnaðarmeting av eini dagføring av Dalalíð. Umsitingin hevur latið gera eina fyribils kostnaðarmeting álj. uml. 0,7 mió. kr. sambært skjali nr. 14/02182-10 og 14/02182-11.

Umsitingin greiðir frá.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Nevndin samtykti, at farast skal undir at gera arbeiðið, fíggjað av kt. 8175, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt ítøkiligt útbjóðingartilfar.
Í sambandi við tilgongdina at fáa bjóðað arbeiðið út, hevur umsitingin havt samskifti við íbúgvar við Dalalíð. Tað varð skjótt staðfest, at umfangið av at dagføra Dalalíð, varð munandi størri og meira umfatandi enn ætlað, og av somu orsøk er lægsta innkomna tilboðið væl hægri enn upprunaliga metingin.

Víst verður til lisitatiónsprotokoll, tillagað tilboð, sum er grundarlagið undir uppskoti til sáttmála við arbeiðstakaran Andrias Berg Sp/f.

**Viðkomandi skjøl:**
TK j. nr. 15/02591-1 : Yvirlitsplanur
TK j. nr. 15/02592-1 : Tilboðslisti
TK j. nr. 15/03386-5 : Lisitatiónsprotokoll
TK j. nr. 15/03386-6 : Tillagað tilboð
TK j. nr. 15/03608-1 : Fíggjarskjal, sum er samlað kostnaðarmeting

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Írestandi fíggjartørvurin er áljóðandi kr. 818.212,- sambært fíggjarskjali, j. nr. 15/03608-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 820.000,- av íløgukarminum fyri vegir, deild 8175.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Uppskot nr. 2 fyri byggistig nr. 2**
Ein fundur hevur verið við eigaran av matr. nr. 882a, Tórshavn. Uppskot nr. 2 fyri byggistig nr. 2 er gjørt sambært ynskjum og áheitan frá eigaranum og sum eigarin helt seg hava eina avtalu við Tórshavnar kommunu um. Eftir at hava gjøgnumgingið skjøl og samskifti í málinum er niðurstøðan tann, at eingin skriftlig avtala finst millum partarnar, sum byggir á ynskir eigarans.
Víst verður til uppskot til hesa vegaloysn, sí TK j. nr. 15/02591-2.
Uppskotið frá eigara byggir uppá eina vegaloysn av einum 5 m breiðum vegi við kantsteini í báðum borðum tó uttan gongubreyt frá vesturmarkinum av matr. nr. 880e og vestur í innkoyringina til sethús eigarans.
Í niðara borð er ein regnvatnskloakk til vegristir til vegvatn og gøtuljóssteyrar. Verandi frítíðarskúrur verður tikin niður og burturbeindur.

**Kostnaðarætlan**
Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri HVÚ áljóðandi 970 tús. kr. eina kostnaðarætlan C fyri alt arbeiðið áljóðandi 1,1 mió. kr.
Fyri at gera arbeiðið bíligari er ætlanin, at Tórshavnar kommuna skal veita tilfar sum byggiharraveiting, og arbeiðstakarin veita arbeiðs- og handverkaratímar og maskintímar.

**Uppskot nr. 3 fyri byggistig nr. 2**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til vegaføring frá vesturmarkinum á matr. nr. 880e og yvir til eysturmarkið av matr. nr. 882a. Uppskot nr. 3 fyri fyri byggistig nr. 2 er gjørt soleiðis, at tað liggur framvið markinum av matr. nr. 881c og inni á kommunalum øki, matr. nr. 881a.
Víst verður til uppskot til hesa vegaloysn, sí TK j. nr. 15/02591-3.

Uppskotið hjá umsitingini byggir uppá eina vegaloysn av einum 5 m breiðum vegi við kantsteini í báðum borðum tó uttan gongubreyt frá vesturmarkinum av matr. nr. 880e og vestur til eysturmarkið av matr. nr. 880a. Verandi skúrur verður standandi.
Í niðara borð er ein regnvatnskloakk til vegristir til vegvatn og gøtuljóssteyrar.

**Kostnaðarætlan**
Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri HVÚ áljóðandi 650 tús. kr. eina kostnaðarætlan C fyri alt arbeiðið áljóðanadi 870 tús. kr.
Fyri at gera arbeiðið bíligari er ætlanin at Tórshavnar kommuna skal veita tilfar sum byggiharraveiting, og arbeiðstakarin veita arbeiðs- og handverkaratímar og maskintímar.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 15/02591-2 Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 2
TK j. nr. 15/02591-3 Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 3

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 870.000,- |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 50.000,- |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 01.03.2017 | Dato 01.07.2017 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| **Upphædd íalt** | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at tikið verður undir við uppskoti nr. 3 til vegaloysn í 2. byggistigi inni á kommunalum øki. Verður tikið undir við hesum, mælir býarverkføðingurin til at gera høvuðsprosjekt av uppskoti til linjuføring av uppskoti nr. 2 í byggistigi nr. 2 frá ognini Dalalíð 7 og yvir til eysturmarkið á matr. nr. 880a, Tórshavn og seta kr. 50.000,- av deild 8175 til innanhýsis prosjektering og bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar og at leggja málið fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Tekniska nevnd 09. januar 2018:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við uppskoti nr. 2, treytað av at tey sjálvi taka skúrin niður, at seta kr. 50.000,- av deild 8175 til innanhýsis prosjektering og bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar og at leggja málið fyri nevndina aftur til støðutakan.

Ein minniluti, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við eigaran av matr. nr. 882a. Eigarin bleiv kunnaður um samtyktina í teknisku nevnd, at uppskot nr. 2 bleiv samtykt, um at tey sjálvi skulu taka skúrin niður fyri egna rokning.

Eigarin tekur nú undir við uppskoti nr. 2 til vegaføring, men við teirri treyt, at vegurin fer uttan um skúrin, soleiðis sum uppskot nr. 3 legði upp til.

Umsitingin hevur nú endurskoðað ætlanina, soleiðis sum uppskot 4 vísir. Ætlanin er at dagføra verandi veg og gera marknaðarumskipan. Hetta er ein betri vegaloysn og kemur eisini at kosta minni.

Maknaumskipa umfatar:
- at verandi vegur, sum er uml. 57 fermetrar, ið nú liggur inni á matr 881c, kemur at liggja sum litra, tað er kommunal ogn.
- at makaskifta vegaøkið við at flyta sunnaru markalinjurnar á matr. nr. 881c og 882a, uml. 1,4 m, inn á matr. nr. 881a, sum Tórshavnar kommuna eigur.

**Hjáløgd skjøl**
TK j. nr. 15/02591-4 Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at varðveita verandi atkomuveg og at dagføra vegin við kantsteinum, vegristum og gøtuljósum, fíggjað av kt. 8110 vegir.
- at maknaumskipa, soleiðis at verandi vegur, ið liggur inni á matr. 881c, kemur at liggja sum kommunalt øki.
- at onki verður gjørt inni á matr. nr. 882a, sum er privat øki, tí hetta fer at gera fordømi og kann hava stórar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, um onnur fara at krevja somu sømdir.

**Tekniska nevnd 26. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tann 12. august 2020, varð ástaðarfundur við eigararnar fram við tí partinum av Dalalíð, ið hoyrir undir 2. Byggistig. Trý uppskot vóru umrødd, uppskot 2, 3 og 4, sí ávikavist:
TK j. nr. 15_02591-2_Dagføring av Dalalíð Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 2,
TK j. nr. 15_02591-3_Dagføring av Dalalíð_Yvirlitsplanur_Uppskot nr. 3,
TK j. nr. 15_02591-4_Dagføring av Dalalíð _Uppskot nr. 4.

Uppskot 4, við smærri tillagingum fekk best undirtøku.

Arbeiði er mett til at kosta kr. 200.000,00.

Skotið verður upp til at gera 2. byggistig, sambært Uppskot 4, ver. 2, grundað á at:
tað ikki gerst neyðugt at grava í vegkassan á Vestara Ringvegi.
tað er tann bíligasta loysnin.
tað er størst undirtøka fyri hesi loysn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at gera 2. byggistig, sambært Uppskoti 4, ver. 2, og fíggja arbeiðið av rakstri, konto 8110 Vegir, og beina málið í fíggjarnevndina at góðkenna, at makaskifti í nevnda uppskoti kann fremjast.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknsiku nevnd.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt, avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum halli á kr. 157.000,-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81021 | Vegastrekkið við Dalalíð | | 157.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at hallið á kr. 157.000,- verður játtað av løgukarminum fyri vegaverkætlair LK81999 á løgukonto L81021, og at verkætlanin L81021 Vegastrekkið við Dalalíð verður lokað og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

## 107/23 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |
| 20 Tekniska nevnd | 09.05.2017 | 31/17 | 14/03118-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 163/17 | 14/03118-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 186/17 | 14/03118-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 66/17 | 14/03118-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 266/17 | 14/03118-2 |
| 25 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 276/17 | 14/03118-2 |
| 26 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 300/17 | 14/03118-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 17/18 | 14/03118-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 112/18 | 14/03118-2 |
| 29 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 34/18 | 14/03118-2 |
| 30 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 187/18 | 14/03118-2 |
| 31 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 150/18 | 14/03118-2 |
| 32 Tekniska nevnd | 14.08.2018 | 45/18 | 14/03118-2 |
| 33 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 235/18 | 14/03118-2 |
| 34 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 193/18 | 14/03118-2 |
| 35 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 222/18 | 14/03118-2 |
| 36 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 47/19 | 14/03118-2 |
| 37 Fíggjarnevndin | 30.09.2019 | 257/19 | 14/03118-2 |
| 38 Býráðsfundur | 30.09.2019 | 233/19 | 14/03118-2 |
| 39 Tekniska nevnd | 30.09.2019 | 55/19 | 14/03118-2 |
| 40 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 66/19 | 14/03118-2 |
| 41 Tekniska nevnd | 12.11.2019 | 75/19 | 14/03118-2 |
| 42 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 332/19 | 14/03118-2 |
| 43 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 286/19 | 14/03118-2 |
| 44 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 15/23 | 14/03118-2 |
| 45 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 101/23 | 14/03118-2 |
| 46 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 107/23 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri 'trafikafvikling' grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12): notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá

í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni. Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.
Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.
Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning
TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við byggingina.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01243-3 | Tilboð frá Articon P/f |
| TK j. nr. 17/01245-1 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at planleggja vegaføringina inni á skúlaøkinum í Marknagili og umleggingina av høvuðsveganetinum rundan um skúlaøkið, sum er Marknagilsvegurin, Landavegurin og Kirkjubøarvegurin.

**Rundkoyring á vegamótinum Landavegur - Samdingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Arbeitt hevur verið við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina rundkoyring á vegamótinum, sum líkist rundkoyringini á vegamótinum Fræsið/Landavegur.

**Sambindingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Vegaføringin er ein tvísporaður vegur á 2*3,25 við 2 m gongubreyt og 2 m súkklubreyt í báðum borðum.
Ein íbinding verður vestur til Dagstovnin við Landavegin, av tí at ætlanir eru um, at verandi íbinding frá Landavegnum verður niðurløgd.
Ein íbinding verður gjørd inn til nýggja musikkskúlan.

Fyri at gera av- og ásetingarætlanina so trygga sum møguligt til nýggja Skúlan á Fløtum, verður vegurin eftir íbindingina eystur til musikkskúlan og niðan til Janusargøtu ein einsrættaður vegur.

**Vit byrja í niðara borði**

| | | |
|---|---|---|
| Gongubreyt | 2,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Einsrættað vegbreyt | 3,25 | m |
| Ferðsluherða | 1,5 | m |
| Vegbreyt til av- og áseting | 2,5 | m |
| Av- og ásetingarherða | 1,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Gongubreyt | 2,0 | m |

**Íbinding frá Janusargøtu og vestur í sambindingarvegnin**
Janusargøta verður bundin í sambindingarvegin.
Her er neyðugt við umleggingum av verandi tekniskum installatiónum í Janusargøtu.
Arbeiðstøkumarkið verður millum ognina hjá Tórshavnar kommunu og økið, sum hoyrir til Glasir.
Ætlanin er at 12 m bussar skulu kunna koyra inn á Janusargøtu frá sambnindingarvegnum. Samstarvsfundir hava verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Glasir, har veganetið inni á kommunalum vegaøki og vegaøkinum hjá Glasir ver planlagt soleiðis, at sleppast kann inn á skúlaøkini við bussum. Eisini verða busslummar planlagdir.

**Íbindingin av Sambindingarvegnum í Marknagilsvegin sunnanfyri íbúðarblokkin við Janusargøtu**
Her verður talan um ein t-kross, sum verður stýrdur av intelligentum ferðsluljósum. Verandi íbinding frá vegnum undir Gráasteini er ikki haldbar, at tí at torført verður at sleppa inn og út á Marknagilsvegin.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Kirkjubøarvegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Landavegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Íbindingarvegur frá Glasir**
Hetta vegamótið verður ein t-krossur, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Atkomuvegur til Dánjalstrøð**
Verandi vegamót verður í fyrstu syftu órørt. Tvs verandi T-krossur verur sum hann er í dag. (Umsitingin arbeiðir í planleggingarfasuni við einum sambingarvegi millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin).

**Marknagilsvegurin frá t-krossinum við Dánjalstrøð og suður til t-krossin við endan á Kirkjubøarvegnum**
Neyðugt er at dagføra og tillaga nevnda vegastrekki, soleiðis at tað passar inn í planløgdu vegamótini, sum verða strýrd við ferðsluljósum. Tað snýr seg í stuttum um øking av vegabreiddini, soleiðis at tað verður pláss fyri høgra- og vinstrasvingsbanum, og vegabanum, sum ganga beint fram.

**Ljósreguleringar**
Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri ráðgevingarfyritøku, sum er serráðgevi og framleiðari av ferðslustýringum í sambandi við umlegging ferðsluni á Marknagilsvegum, vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur og verandi ferðsluljósum í býnum. Hendan ráðgevandi fyritøkan er veitari av teimum trimum verandi ferðslustýrdu vegmótunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.
Fundir millum umboð fyri ráðgevan og Tórshavnar kommunu hava verið í Tórshavn 2.- 3. og 4. mai.
Ferðslustýrdu vegamótini koma at tosa saman gjøgnum eina radarskipan, sum verður partur av teknisku loysnini, soleiðis at ferðslan kann ganga so ótarnað sum gjørligt. Til ber eisini at gera broytingar í sjálvari stýringini av ferðslustýringini gjøgnum fartelefon ella gjøgnum teldu, um hetta gerst neyðugt. Eisini verður møguligt hjá teknisku umsiting at fylgja við vegamótunum digitalt og visuelt. Møguleiki er eisini at fáa feilmeldingar gjøgnum sms og teldupost, soleiðis at feilir kunnu rættast uttan at fara á staðið.

**Ferðslusimuleringar**
Ferðslusimuleringar eru gjørdar og verða dagførdar eftir tørvi.

Mælt verður til, at veitingin og ráðgevingin í sambandi við ferðslustýrdu ljósini verður sum byggiharraveiting.
Arbeitt verður við at bjóða ráðgevingina í sambandi við entreprenørarbeiðið út 9. mai. 2017.

**Tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar**

| | | |
|---|---|---|
| Glasir | Heystið | 2018 |
| Nýggi musikkskúlin | Várið | 2019 |
| Skúlin á Fløtum | Heystið | 2020 |

Umbyggingin av Marknagilsvegnum saman við ferðslustýrdu vegamótunum nr. 3 og 4 og vegurin frá Marknagilsvegnum og oman í Janusargøtu verður liðugt gjørt til komandi summar. Víst verður til plantekning.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Fyribils kostnaðarmeting og gjaldsætlan**
Umsitingin hevur, saman við byggiharraráðgevanum, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting og eina gjaldsætlan, hvussu arbeiðið kann verða raðfest yvir ár, soleiðis at tey planløgdu arbeiðini verða liðug til tíðina. Víst verður til omanfyri standandi tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar.
Verandi ráðgevi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av planløgdu arbeiðunum, sum eru fyri framman. Eisini er eitt kortskjal gjørt, har ein kostnaðarmeting er sett í rammu fyri hvørt arbeiðið sær.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01246-3 | HMP-Consult_Kostnaðarmeting saman við einum kortskjali |
| TK j. nr. 16/02144-7 | Yvirlitskort av vegaføringum og vegamótum saman við Orthofoto |
| TK j. nr. 17/01245-2 | Kostnaðarmeting C og gjaldsætlan fyri nevndu arbeiðir |
| TK j. nr. 14/03118-68 | Notat frá Rambøll – Trafikafvikling Marknagil |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna fyriliggjandi prosjektuppskot, bjóða út ráðgevingararbeiðið at gera høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mai 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti:**
Projektleiðslan fyri Skúlan á Fløtum mælir staðiliga til, at vegurin frá Marknagilsvegunum til Landavegin verður gjørdur beinanvegin.

Grundgevingin er at spreingjast skal fyri vegnum, kloakk og fjarhita, sum kann skaða bygningin, um hettar verður gjørt seinni. Enn eru bert fundament og veggir stoypt.

Vegaføringin er bert 20 m frá Skúlanum á Fløtum og nærri Musikkskúlanum, sum eisini er í gerð.

Tekniska umsitingin hevur, saman við ráðgevanum, mett um kostnaðin av at gera vegakassan heilt oman til Landavegin, soleiðis at hann kann brúkast til arbeiðsveg, at leggja kloakkleiðingar, og gera tað møguligt at føra fjarhitaleiðingarnar farm til til skúlan á Fløtum og Musikkskúlan. Metti kostnaðurin fyri hetta er 5,2 mió. kr. uttan MVG.

Yvirlit yvir ætlaða játtan verður tøkt til fundin í Fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við projektleiðsluni og mæla til at fáa eina eykajáttan á 6 mió. kr., fíggjað av tøkum peningi á tekniska økinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Eisini verður mælt til at arbeiðið verður boðið út beinan vegin, við tí treyt at fígging fæst.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 6 mió kr., ið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við atkomuviðurskifti við Glasir, er avrátt at av- og á skipan til Glasir skal skipast á teirra egna øki. Hendan ætlan ber í sær, at tal av parkeringsplássum minkar við umleið 30 plássum. Skotið verður upp at etablera tey mistu p-plássini á økinum omanfyri skúlan, (sí skitsu 01). Hettar økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu og Føroya Handilsskúla.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við at arbeitt verður víðari við uppskotinum og mæla til, at kommunan útvegar neyðugan part av lendinum burtur av matr. nr. 1101a.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin arbeiðir við eini endaligari parkeringsloysn sum umfatar alt økið.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina hjá teknisku nevnd, skal umsitingin arbeiða við einari endaligari parkeringsloysn, sum umfatar alt økið burturav matr. nr. 1101a, Tórshavn, sum liggur millum bygningin hjá Handilsskúlalanum og matr. nr. 1101b, Tórshavn. Neyðugt er tískil, at hesin parturin av matr. nr. 1101a, Tórshavn, verður lagdur av til parkeringsøki allur sum hann er.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við teknisku nevnd og leggja tann í ískoytinum nevnda part av matr. nr. 1101a, Tórshavn, av til parkeringsøki sum liður í einari endaligari parkeringsloysn fyri økið kring Glasir.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Komið er nú somikið áleiðis, at vegamótini sunnan- og norðanfyri Handilsskúlan skulu fremjast. Glasir tekur eftir ætlan nýggja skúlan í brúk komandi skúlaár og miðað verður ímóti at vegamótini tá eru liðug. Í tí sambandi er neyðugt at fáa arbeiðið boðið út og at keypa inn ferðsluljósini til bæði vegamótini.

Projekteringin er liðug og klárt er at bjóða arbeiðið út. Sí viðhefta skjal, Planur Marknagilsvegur, j.nr. 14/03118-85.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd av omanfyri nevnda arbeiði, áljóðandi kr. 4.300.000,- Ætlanin er, at kommunan sjálv keypir inn ferðsluljósini og at sjálvt vegarbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Avsettar eru kr. 2.000.000,- til vegagerð í Marknagili í inniverandi ári. Framfluttar eru kr. 6.426.000,- frá 2017. Samlaða játtanin er sostatt kr. 8.426.000,- Av hesum skulu kr. 4.030.000,- til vegagerð fram við skúlanum á Fløtum.

Mett verður at alt arbeiðið kann fremjast fyri játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeiðið verður boðið út, og at kommunan keypir og fær til vega ferðsluljós til vegamótini.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir samtyktina í Teknisku nevnd 08.mai 2018, skuldi málið verið beint í Býráðið umvegis Fígggjarnevndina. Tað koma tað av misgávum ikki, hetta verður við hesum gjørt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtanin á kr. 2 mió. til endamalið verður flutt av L00001 yvir á verkætlanina L81018 og málið verður beint í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Sum lýst omanfyri, samtykti tekniska nevnd á fundi tann 8. mai 2018, at arbeiðið við at betra um umstøðurnar við Marknagilsvegnum skuldi bjóðast út og at keypt verða inn ferðsluljós til tey bæði vegamótini, sum hava við atkomuviðurskiftini hjá Glasi at gera.

Ferðsluljósini eru bíløgd og koma tey til landið síðst í august og verða tá eftir ætlan uppsett.

Vegaprojektið hevur verið boðið út í tveimum umførum og er lægsta tilboð 10,7 mió. kr. uttan MVG. Afturat hesum skal roknast við óvæntaðum og projekteringsútreiðslum, eins og uppsetan av ferðsluljósum. Samlað kemur hendan verkætlanin at kosta góðar 13 mió. kr.

Tøkur peningur til verkætlanina er p.t. kr. 5.392.000,-. Av hesari upphædd skulu brúkast kr. 2.787.000,- til vegarbeiði sum er ígongd og til ferðsluljósini. Eftir av játtanini eru sostatt **kr. 2.600.000,-** Sí talvu niðanfyri.

Um verkætlanin skal fremjast, krevur tað at neyðugur peningur er tøkur til endamálið. Hettar kann gerast við flyting millum konti og eini eykajáttan.

| | **Upphædd** |
|---|---|
| Kostnaður í alt | 13.300.000 |
| Tøk upphædd á L81018 (8175) | -2.600.000 |
| | 10.700.000 |
| Fíggjast av L00002 (8175) | -6.636.000 |
| At fíggja av konto 6175 | 4.064.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við verkætlanini, at tikið verður av tilboðnum og at peningurin til verkætlanina verður fingin til vega við at fluttar vera kr. 6.636.000 frá L00002 til L810018 og at fíggja restina, kr. 4.064.000 av konto 6175, sum ein eykajáttan.
Málið viðvíkjandi eykajáttan á kr. 4.064.000 av konto 6175 verður umvegis teknisku- og fíggjarnevnd beint í Býráðið, har tað krevur 2 viðgerðir.

**Tekniska nevnd 14. august 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykt at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og 4 blonkum.
Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Kaj Leo Holm Johannesen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongar ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreassen, Bergun Kass og Odd Færø.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
**Verkætlanin L81018 Miðstaðarøki Marknagil er uppbýtt í niðafyri nevndu stig:**

1. Arbeiðsvegur: Hans Andriasargøta & Janusargøta (er gjørt).
2. Marknagilsvegur: Undir Gráasteini til Dánjalstrøð & Janusargøta (í gerð).
3. Hans Andriasar gøta«Kiss and ride» og P-pláss (at seta í útboð).
4. Vegur til Musikkskúlan (at seta í útboð).
5. Vegamót Landavegur, ferðsluljós (at seta í útboð).
6. Marknagilsvegur: vegamótini við Landavegin og Velbastaðvegin (bíðar).
7. Dagføring av vegi Undir Gráasteini.

Fyrsta verkætlanarstig, at gera arbeiðsvegirnar fram við nýggja Musikkskúlanum og komandi skúlanum á Fløtum, er liðugt og uppgjørt.

Annað verkætlanarstig, at breiðka og ferðslutryggja Marknagilsvegin millum vegamótini Dánjalstrøð – Janusargøta, er í gongd og er komið so væl áleiðis, at koyribreyt, ovara gongubreyt og vegjaðari eru liðug. Eftir eru at gera niðaru gongubreyt, uppstrikingar, gøtuljós v.m., og verður hetta ætlandi liðugt um hálvan januar 2020.

Byggileiðslan hevur fyrireika avtalu við arbeiðstakaran KONSAX, sum hevur støði í somu eindarprísum sum eru í verandi sáttmála, um at liðugtgera Janusargøtu. P-plássið hjá dagstovninum við Landavegin skal somuleiðis dagførast, nú innkoyringin til dagstovnin verður flutt frá Landavegnum til Hans Andriasar gøtu.

Glasir og Musikkskúlin eru tikin í nýtslu, og umráðandi er, at farið verður undir triðja verkætlanarstig, sum er at gera Hans Andriasar gøtu lidna, íroknað vegamót á Landavegnum, um henda gøta skal vera tøk, tá skúlin á Fløtum verður tikin í nýtslu á sumri 2020. Prosjekt til liðuggerð av Hans Andriasar gøtu við síðugøtu til Musikkskúlan er tøkt og klárt til útboð.

Í sambandi við ætlaða vegin, hevur umsitingin fingið í lag avtalur við ognarar fram við vegnum um útvegan av lendi fyri umleið 1. mió., um verkætlanin verður útint. Sum partur av vegaprosjektinum er

ætlanin at leggja avgrevstur í ein volla fram við vestursíðuni á vegnum, við planting omaná, sum vind verja móti tráu vesturættunum (sí tekning Vegplanur við volla, j.nr. 14/03118-302).

Fimta verkætlanarstig, at gera vegamótið Landavegur – Hans Andriasar gøta, er í gerð sum partur av arbeiðinum, sum fer fram á Landavegnum.

Samlaði kostnaðurin fyri alla verkætlanina er mettur til kr. 56.842.057. Samlaða játtanin til verkætlanina higartil er kr. 25.625.000. Sostatt vanta kr. 31.217.057 til liðuggerð av verkætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. At heimila umsitingini at gera avtalu við verandi arbeiðstakara KONSAX P/F um liðuggerð av Janusargøtu og at tillaga P-økið hjá dagstovninum við Landavegin til nýggju tilkoyringina frá Hans Andriasar gøtu.
2. At biðið verður um eina eykajáttan í 2019 uppá kr. 3.100.000 av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið til verkætlanina L81018, soleiðis at verandi arbeiði kann halda fram.
3. At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Talan er um flyting av játtan millum verkætlanir undir somu høvuðskonto, og krevur tí viðgerð í teknisku nevnd, fíggjarnevnd og eina ferð í býráðnum.
4. At heimila umsitingini at seta í útboð og gera sáttmálar um liðuggerð av niðanfyri nevndu arbeiðum í 2020:
    - Hans Andriasar gøta
    - Vegur til Musikkskúlan, aftanfyri
    - Vegamót við Landavegin
    - Útvegan av lendi Landaveg og Marknagilsveg
5. At biðið verður um kr. 20.000.000 av íløgum 2020, til liðuggerð av Hans Andriasar gøtu v.m., at gera í 2020.
6. At biðið verður um kr. 8.200.000 av íløgum 2021, til liðuggerð av vegamótunum Landavegur og Velbastaðvegur, at gera í 2021.
   At umbønirnar verða beindar í býráðið umvegis fíggjarnevnd.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við pkt. 1, 2 og 3 og at beina málið um liðuggerð av Hans Andriasar gøtu, Vegur til Musikkskúlan, Vegamót við Landavegin og Útvegan av lendi í fíggjarnevndina, at taka við í arbeiðinum at gera fíggjarætlan fyri 2020.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at fíggjarælтanin fyri 2020 ikki er endaliga viðgjørd enn. Eisini verður víst á, at tær viðmerkingar, minnilutin hevur havt, ikki eru tiknar til eftirtektar. Vit hava viðmerkt, at tað ikki er rætt at seta 6 av ljóskurvunum í heildarætlanini upp, og eisini hava vit víst á, at rættari hevði verið at gjørt eina rundkoyring á vegamótinum Dánjalstrøð/Markagilsvegur og at breiðka Marknagilsvegin enn meira, har hetta er møguligt. Eisini vísir minnilutin á, at arbeiðið er heldur ikki bjóðað út.

**Ískoyti:**
Um arbeiðið, at gera vegirnar Janusargøta og Hans Andriasar gøta, skal verða liðugt áðrenn Skúlin á Fløtum verður tikin í brúk, eftir summarfrítíðina 2020, so skal arbeiðið byrja nú beinanvegin.

<u>Janusargøta (millum Bónus og Glasir):</u>
Umsitingin hevur gjørt uppskot til avtalu millum TK og P/F Konsax, um liðuggerð av Janusargøtu, umframt at tillaga P-økið hjá dagstovninum við Landavegin til nýggju tilkoyringina frá Hans Andriasar gøtu. Talan er um eina avtalu við somu eindarprísum sum í sáttmálanum um Marknagilsvegin. Samlaði kostnaðurin av arbeiðinum er mettur til kr. 3.000.000.

Ætlanin er at fíggja hetta av konto 8175, L00001, sum er løgukarmur fyri árið til vegir.
L81018 er løgukonto til Miðstaðarøkið við Marknagil

<u>Hans Andriasar gøta (frá Marknagilsvegnum til Landavegin):</u>

At gera Hans Andriasar gøtu lidna, verður mett at kosta kr. 17,5 mió. og tá er vegurin inn til Musikkskúlan ikki við.

Mett verður, at um arbeiðið verður boðið út beinanvegin, so eigur tað at bera til at fáa vegin lidnan, áðrenn Skúlin á Fløtum letur upp, eftir summarfrítíðina 2020.

Útbjóðingartilfar er gjørt og arbeiðið er klárt at bjóða út.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. At heimila umsitingini at gera avtalu við verandi arbeiðstakara KONSAX P/F um liðuggerð av Janusargøtu og at tillaga P-økið hjá dagstovninum við Landavegin til nýggju tilkoyringina frá Hans Andriasar gøtu.

2. At játta kr. 3.000.000 av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur, til verkætlanina L81018, soleiðis at verandi arbeiði kann halda fram.

3. At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Talan er um flyting av játtan millum verkætlanir undir somu høvuðskonto, og krevur tí viðgerð í teknisku nevnd, fíggjarnevnd og einaferð í býráðnum.

4. At heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út í sambandi við liðuggerð av Hans Andriasar gøtu og vegamótið við Landavegin.

**Tekniska nevnd 30. september 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 10. september 2019.

**Fíggjarnevndin 30. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Teknisku nevnd og beinir málið í býráðið til eina viðgerð.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at peningurin verður tikin av játtanini til innkomuvegin.

**Býráðsfundur 30. september 2019:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot í mun til samtyktina hjá fíggjarnevndini: Mælt verður til at játta kr. 3.000.000 av konto 20910 til liðugtgerð av Janusargøtu.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið fall við trimum atkvøðum fyri, sjey ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Turið Horn.

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið hjá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, einari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Turið Horn.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur boðið arbeiðið út, í sambandi við liðuggerð av Hans Andriasar gøtu og vegamótið við Landavegin, til tveir arbeiðstakarar í innbodnari lisitatión.

Lisitatión verður mánadagin 4. november 2019.

Úrslitið av lisitatiónini og tilmæli verður tøkt til nevndarfundin.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tvey tilboð komu inn uppá útbodna arbeiðið:

- P/F Articon beyð sær til at gera arbeiðið fyri kr. 16.682.422,- uttan MVG.
- P/F KONSAX beyð sær til at gera arbeiðið fyri kr. 17.344.888,- uttan MVG.

P/F KONSAX lat inn alternativt tilboð á kr. 16.459.571,-, um kantsteinar verða tiknir úr verkætlanini og at vegjaðarin verður málaður við termoplasti í staðin.

Umsitingin metir ikki tær umleið kr. 222.851,-, sum alternativa boðið er undir lægra tilboðnum, ið er frá Articon, er nøktandi orsøk til at taka av alternativa tilboðnum, við tað at kantsteinar, umframt at beina ferðslu og vatn framvið gongubreytum, eisini er fysiskur skilnaður millum gangandi og bilferðslu.

Tilboðini eru væl hægri enn tann upphædd ið áður hevur verið mett, og eru ráðgevar kommununnar, eftir at tilboðini eru eftirkannað, komnir eftir, at eindar prísirnir fyri tilfars- og arbeiðsveitingarnar í tilboðunum ikki eru í hægra lagi, men at munandi meiri er boðið út enn tað sum framgekk av undanfarnum kostnaðarmetingum.

Tað, sum ikki er komið við í undanfarnum kostnaðarmetingum, er:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Rundkoyring, parkering (Kiss and Ride) við Skúlan | uml. | kr. | 2,0 mió. |
| At meiri arbeiðið er tikið við í.s.v. við Marknagilsvegin | uml. | kr. | 4.5 mió. |
| Busshvíliplass í Janusargøtu | uml. | kr. | 0,5 mió. |

Umsitingin hevur saman við ráðgevum kommununnar og við støði í lægra tilboðnum, ið er frá P/F Articon, mett, at samlaða arbeiðið at liðuggera Hans Andriasar gøtu, kann gerast fyri tilsamans kr. 20.9 mió., tá byggileiðsla, MVG, óvæntað, trygging og byggiharraveitingar (ferðsluljós) er íroknað (sí j.nr. 14/03118-312 Kostnaðarmeting 6. nov. 2019), og tá er busshvíliplass í Janusargøtu tikið úr arbeiðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At taka av lægra tilboðnum frá Articon.
2. At gera sáttmála við Articon um arbeiðið.
3. At játta kr. 20.000.000,- íroknað MVG, byggileiðslu og annað á konto 8175, á nýggja verkætlan við navninum «Liðuggerð av Hans Andriasar gøtu».
4. At restin kr. 900.000,- verður rindað av løgujáttanini til Skúlan á Fløtum sum gjald fyri rundkoyring og P-pláss til skúlan, og um tað ikki ber til, so at finna sparingar, ella taka arbeiði burtur úr sáttmálanum.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun kass, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við teknisku nevnd og mælir til, at arbeiðið verður boðið út aftur millum fleiri arbeiðstakarar.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, einari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Sáttmáli um dagføring av Marknagilsvegnum, millum vegamótini Dánialstrøð og Undir Gráasteini og Janusargøtu, varð gjørdur við Spf Konsax tann 22.10.2018. Arbeiðið gekk væl, og varð arbeiðið avhendað til Tórshavnar kommunu tann 27.04.2020.
Verkætlanin L81018 Miðstaðarøki Marknagil hevur avlop á kr. 25.674,-

Sáttmáli um liðugtgerð av Hans Andriasargøtu millum Marknagilsvegin og Landavegin, varð gjørdur við pf Articon tann 17.12.2019. Arbeiðið gekk væl, og varð arbeiðið avhendað til Tórshavnar kommunu tann 30.06.2021.
Verkætlanin L81036 Liðugtgerð av Hans Andriasargøtu hevur avlop á kr. 457.630,-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☒ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | L81018 | Miðstaðarøki Marknagil | L8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | Kr. 25.674,- |
| 8175 | L81036 | Liðuggerð av Hans Andriasargøtu | L8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | Kr. 457.630,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at nevndu upphæddir á ávikavist kr. 25.674,- og kr. 457.630,- verða játtaðar á Løgukarmin fyri vegaverkætlair LK81999, og at verkætlanirnar L81018 Miðstaðarøki Marknagil og L81036 Liðuggerð av Hans Andriasargøtu verða lokaðar, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 108/23 Broytan av svingi í Blómubrekku

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 28/20 | 20/01731-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 35/20 | 20/01731-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 230/20 | 20/01731-2 |
| 4 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 199/20 | 20/01731-2 |
| 5 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 232/20 | 20/01731-2 |
| 6 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 19/23 | 20/01731-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 108/23 | 20/01731-2 |
| 8 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 108/23 | 20/01731-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Blómubrekka er knýtt í Villingadalsvegin, er stór ónøgd við krappa svingið miðskeiðis á strekkinum. Hetta sving er gjørt fyri langari tíð síðan, áðrenn ætlanina at knýta í Villingadalsvegin.

Kommunan hevur havt samráðingar við Bústaðir um at sleppa inn á økið hjá teimum, fyri at gera svingið meira lagaligt at koyra ígjøgnum.
Grundin til at tað verður gjørt nú er tann, at Fjarhitafelagið skal leggja leiðingar har nú.

Verkætlanin verður fíggjað av rakstrarkonto fyri vegir 8110. Kostnaðurin er 1 mió. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 417<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Upprunaliga var ætlanin at fíggja arbeiðið, at broyta svingið við Blómubrekku, av rakstarkonto 8110 vegir.

Í veruleikanum er talan um eina verkætlan. Harumframt er talan er um eina upphædd, sum tyngir rakstrarkonto 8110 ov nógv, og tí verður heldur mælt til at fíggja hesa verkætlan av 6875 – L00002, framfluttur løgukarvmur, við kr. 389.000 og av 6875 – L00001, løgukarmur fyri árið, við kr. 611.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr. 389.000 av konto 6875, L00002 framfluttur løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Broytan av svinginum í Blómubrekku»
- at játta kr. 611.000 av konto 6875, L00001, løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Broytan av svinginum í Blómubrekku»
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 10.624,-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81038 | Broytan av svingi í Blómubrekku | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | 10.624,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at avlopið á kr. 10.624,- verður flutt av løgukonto L81038 Broytan av svingi í Blómubrekku á løgukarmin fyri vegaverkætlair LK81999, báðar undir deild 8175 Vegir (íløgur), og at verkætlanin L81038 Broytan av svingi í Blómubrekku verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 109/23 Vegur til biogassverkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 37/20 | 20/02256-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 231/20 | 20/02256-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 200/20 | 20/02256-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 233/20 | 20/02256-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 20/23 | 20/02256-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 109/23 | 20/02256-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 109/23 | 20/02256-1 |

**Upprunin til málið:**
Nýtt biogassverk á Skarðshjalla

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Biogassverkið hevur keypt øki inni á Skarðshjalla til sítt virksemi, er neyðugt hjá kommununi at fáa veg gjørdan til økið. Talan er um at leinga verandi veg áleið 70 m.

Upprunaliga var ætlanin at fíggja arbeiðið av rakstarkonto 8110 vegir.

Í veruleikanum er talan um eina verkætlan. Harumframt er talan um eina upphædd, sum tyngir rakstrarkonto 8110 ov nógv, og tí verður heldur mælt til at fíggja hesa verkætlan av 6875 – L00001, løgukarmur fyri árið, við kr. 1.300.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr. 1.300.000 av konto 6875, L00001 løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Vegur til Biogassverkið»
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at leingja vegin til biogassverkið er liðugt. Staðfestast kann eitt hall á kr. 81.015,-

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81999 | Vegur til Biogassverkið |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | L81039 | Vegaverkætlanir | Nei |

| **Upphædd** |
|---|
| kr. 81.015 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at flyta kr. 81.015,- av løgukarminum LK81999 Vegaverkætlanir á løgukonto 81039 Vegur til biogassverkið, at loka verkætlan L81039 Vegur til biogassverkið, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 110/23 Baraldsgøta 2 - grót rapar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 5/21 | 20/03740-16 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 29/21 | 20/03740-16 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 66/21 | 20/03740-16 |
| 4 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 21/23 | 20/03740-16 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 110/23 | 20/03740-16 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 110/23 | 20/03740-16 |

**Upprunin til málið:**
Avbjóðing av hæddarmuninum millum kommunalan veg, Blómubrekka, og útstykkingina fram við Baraldsgøtu 2 og 4.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrst varð givið loyvi til útstykking og hareftir tók kommunan avgerð um, at Blómubrekka skuldi halda fram frá Baraldsgøtu og bindast í Villingadagsvegin. Tá vegurin varð prosjekteraður var tað greitt, at grundað stóran hæddarmun, skuldi ein stuðlamúrur gerast millum grundøkini og vegin. Av tí at tað lá nógv sprongt grót á Baraldsgøtu 2 og 4, bleiv stuðlamúrur ikki gjørdur har. Tað vísir seg nú at vera neyðugt at stoypa garð fyri at tryggja vegin, og samstundis gera tað møguligt at byggja har byggiloyvið er givið.

Umsiting kommununnar hevur samskift við eigararnar av matr. nr. 1362t og 1362u, og semja er um eina loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
NA

**Upplýsingar frá umsitingini**
NA

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
NA

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
NA

**Umhvørvisárin**
NA

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
NA

**Skjøl**
Prosjekt, skjal j. nr. 20/03740-23
Kostnaðarmeting, j. nr. 20/03740-34

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Sp/f Ráð, Kári Lamhauge, hevur gjørt eitt prosjekt og tilhoyrandi kostnaðarmeting, sí skjal j. nr. 20/03740-34.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk 0 | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk 0 | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 15.04.2021 | Dato 31.09.2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk 0 |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 8175 | Nýggj | | 8175 | L00001 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
1) tryggja vegkassan sambært prosjekt, skjal j. nr. 20/03740-23.
2) fíggja kostnaðin á kr. 1,0 mió. av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið, á nýggja verkætlan "Stuðlamúrur Baraldsgøta" á konto 8175.
3) beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 9.616,-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☒ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | L81040 | Stuðlamúrur Baraldsgøta | 8175 | L81999 | Vegaverkætlanir | | 9.616,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at avlopið á kr. 9.616,- verður flutt av løgukonto L81040 Stuðlamúrur Baralsdgøta á løgukarminum fyri vegaverkætlanir LK81999, báðar undir deild 8175 Vegir (íløgur), og at verkætlanin L81040 Stuðlamúrur Baraldsgøta verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>27. april 2023 | Blað nr.: 425<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 111/23 Áheitan um fund um parkeringsviðurskiftini við Nazaret í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 62/22 | 22/04229-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 256/22 | 22/04229-3 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 247/22 | 22/04229-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 17.04.2023 | 22/23 | 22/04229-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 111/23 | 22/04229-3 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 111/23 | 22/04229-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá samkomuni um fund við TK um parkeringsplássið hjá teimum.

**Lýsing av málinum**
Umboð fyri samkomuna Nazaret í Kaldbak var á fundi hjá TK og greiddi frá parkeringsviðurskiftunum á teirra parkeringsplássi.

Millum annað varð víst á, at parkeringsplássið verður brúkt í stóran mun til almenna parkering, og eisini nógv brúkt í sambandi við skúlan. Skúlin hevur onki parkeringspláss.

Teir greiddu frá, at parkeringsplássið nú var so nógv slitið, at asfaltering er neyðug.

Økið er 350 $m^2$, og er ein asfaltering mett at kosta 160.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81036 | HAG | 8175 | | Asfaltering av p-øki hjá Nazaret | Ja | 160.000,- kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 160.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0,- |

**Tilmæli:**
Vísandi til at økið í stóran mun verður brúkt sum alment parkeringspláss, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at stuðla asfalteringini við 160.000 kr., treytað av at ein brúksavtala við samkomuna, ið varðar minst 20 ár, verður gjørd.

Hetta kann fíggjast soleiðis:
- At játtaðar verða kr. 160.000 av konto 8175, Vegagerðir, L81036, Liðuggerð av Hans Andriasar gøtu, á konto 8175, nýggj verkætlan "Asfaltering av parkeringsøki hjá samkomuni Nazaret.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umboð fyri samkomuna Nazareth í Kaldbak hava, eftir at samtykt varð at játta kr. 160.000 til at asfaltera økið rundan um samkomuna, boðað Tórshavnar kommunu frá, at samkoman kortini ikki vil gera avtalu um, at kommunan asfalterar økið afturfyri 20 ára brúksrætt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81048 | Asfaltering av parkeringsøki hjá samkomuni Nazaret | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | 160.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Teknisku deild mæla til, at játtanin á kr. 160.000,- verður flutt av løgukonto L81048 Asfaltering av parkeringsøki hjá samkomuni Nazaret á løgukarmin fyri vegaverkætlair LK81999, og at verkætlanin L8108 Asfaltering av parkeringsøki hjá samkomuni Nazaret verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 112/23 Tórshavnar havn - Reglugerð fyri gestapláss í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 17.04.2023 | 7/23 | 23/01650-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 112/23 | 23/01650-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 112/23 | 23/01650-2 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á at skipa viðurskiftini viðv. umsitingi av plássum til gestabátar í Vágsbotni.

**Lýsing av málinum**
Í Vágsbotni og úti í Bakka eru pláss til gestabátar. Plássini eru væl umtókt og verða nógv nýtt, serliga í summarhálvuni. Ætlanin við hesum plássum er at bátar, bæði útlendskir og føroyskir, kunnu liggja her í nakrar dagar, meðan teir vitja í havnini.
Ein avbjóðing er tó, at summir (serliga føroyskir) bátar liggja í so leingi í gestaplássunum, og harvið verða ov fá leys pláss til ferðandi bátar. Í einstøkum førum liggja bátar ein stóran part av summarinum, og verða nýttir sum summarbýli. Orøkin til tess kann vera, at tað er ov bílígt at liggja í gestaplássunum í eitt longri tíðarskeið. Kostnaðurin í dag er 150 kr. um dagin 4 teir fyrstu dagarnir, og síðani 300 kr. um dagin frá 5.degi.

Umsitingin hevur tískil gjørt eitt uppskot, til reglugerð fyri gestaplássini í Vágsbotni og úti í Bakka (J.nr. 23/01650-1). Sambært uppskotinum kunnu bátar í mesta lagi liggja í 10 dagar í gestaplássunum og prísurin verður 200 kr um dagin fyri teir fyrstu 10 dagarnar. Um bátar allíkavæl liggja longri enn 10 dagar, verður prísurin 500 kr um dagin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnarmeistari mælir til at taka undir við reglugerðini fyri gestapláss í Vágsibotni, J.nr. 23/01650-1, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men við tí broyting at eftir 10 dagar verður prísurin 1000 kr um døgnið. Í sambandi við burturvísing verður gjaldið 2.000 kr. um døgnið.og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 113/23 Tórshavnar havn : Broyting í reglugerð fyri bátapláss á landi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 17.04.2023 | 8/23 | 23/01670-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 113/23 | 23/01670-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 113/23 | 23/01670-2 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á tillagingum av reglugerð fyri bátapláss á landi.

**Lýsing av málinum**
Galdandi reglugerð fyri bátapláss er frá 2014. Tørvur er at gera einstakar tillagingar av reglugerðini, serliga viðvíkjandi gjaldinum, burturkasti og nýtslu av vaskiplássi.

Viðv. gjaldinum:

Tað er ein trupulleiki fyri bátaøkini á landi, at summir bátar standa ov leingi uppi og upptaka avmarkaða talið av bátaplássum. Harvið sleppa ov fáir bátar framat bátaplássunum at gera viðlíkahald.

Sambært galdandi reglugerð eru teir fyrstu 30 dagarnir ókeypis at standa á bátaplássunum, og síðani kostar tað ávíkavist 30 kr/dag (bátar smalari enn 260 cm) og 50 kr/dag (bátar breiðari enn 260 cm). Tó er ókeypis at standa á bátaplássinum í tíðarskeiðnum 1.desember til 30.mars.

Umsitingin metir, at tað kann vera ein loysn at hækka gjaldið fyri at standa á bátaplássunum í longri tíð, fyri at skunda undir bátaeigarar at fáa bátarnar á sjógv aftur so skjótt sum gjørligt.

Skotið verður upp hesar broytingar viðv.gjaldinum:

- Fyri føroyskar bátar og bátar úr timbri verða fyrstu 30 dagarnir framvegis ókeypis, men at fyri bátar úr glasfibur og plast verða bert teir fyrstu 14 dagar ókeypis, av tí at slíkir bátar ikki krevja eins nógv viðlíkahald sum bátar úr timbri.
- Gjaldið fyri at standa longri enn 6 mánaðar verður hækkað úr ávíkavist 30 kr/dag (bátar smalari enn 260 cm) og 50 kr/dag (bátar breiðari enn 260 cm) til 100 kr/dag fyri allar bátar uttan mun til stødd.
- Gjaldið fyri at standa longri enn 12 mánaðar verður hækkað úr ávíkavist 30 kr/dag (bátar smalari enn 260 cm) og 50 kr/dag (bátar breiðari enn 260 cm) til 300 kr/dag fyri allar bátar uttan mun til stødd.
- At um bátur hevur staðið í bátaplássinum í meiri enn 6 mánaðir, verður fult gjald kravt alt árið.

Viðv. burturkasti og vaskiplássi:

Nýggja bátahavnin í Álakeri verður betri útgjørd enn onnur eldri bátaøki, við t.d. betri vaskiplássi, ið hevur reinsiskipan til dálkandi metallir, umframt betri møguleika fyri skiljing av burturkastinum.

Fyri at tryggja, at bátar einans verða vaskaðir á vaskiplássinum, soleiðis at frárensluvatnið kann verða reinsað, og at burturkastið eisini verður skilt samsvarandi burturkastskipanini á plássinum, verður mett neyðugt at innseta krav í reglugerðini, at um bátaøkið er útgjørt við vaskiplássi og umstøðum at skilja burturkast, so skulu hesar skipanir nýtast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Galdandi reglugerð fyri bátapláss á landi, frá 1. mars 2014.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.Nr. 23/01670-1 : Reglugerð fyri bátapláss á landi.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnarmeistari mælir til at taka undir við broyttu reglugerðini fyri bátapláss á landi, J.nr. 23/01670-1, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 114/23 Broyting í reglugerðini um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 17.04.2023 | 10/23 | 23/01820-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 114/23 | 23/01820-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 114/23 | 23/01820-1 |

**Upprunin til málið**
Ynski/tørvur á 2 tillagingum í reglugerðini

**Lýsing av málinum**
Nr.1:
Sambært lóg um skráseting av skipum skulu bátar skrásetast í føroysku skipa- ella farskránni.

Fyri betri at kunna halda skil á at bert bátar úr Tórshavnar kommunu brúka bátaplássini í kommununi, verður skotið upp at seta inn soljóðandi áseting inn sum nýtt stk. 2 í § 2 í reglugerðini fyri nýtslu av bátaplássum:

*"Bátar í bátaplássi í Tórshavnar kommunu skulu vera skrásettir í føroysku skipa- ella farskránni við havnakenningarnummari, sum hoyrir til bygdir í Tórshavnar kommunu, t.e. ávíkavist TN ella VN."*

Nr.2:
Í umsóknarskjalinum um bátapláss í Tórshavnar kommunu er mest loyvda longdin á báti ásett til 12. Hendan áseting er tó ikki í sjálvari reglugerðina, og tí kann tað koma fyri, at bátaeigari, sum skiftir bát um, ikki verður varugur við hesa avmarking.

Avmarkingin er neyðug, tí at bátabrúgvar og festi tola ikki, at ov nógvir stórir bátar verða lagdir við brúnna.

Tí verður skotið upp, at seta inn soljóðandi áseting sum nýtt stk. 6 í § 5 í reglugerðini fyri nýtslu av bátaplássum (ásetingin er einsljóðandi við áseting í umsóknaskjalinum):

*"Mest loyvda longdarmátið á báti til bátapláss í Tórshavnar kommunu er 1200 cm. Tá longdin verður mátað, skal tað vera longsta møguliga mátið, t.v.s. at alt á bátinum telur við."*

Bæði hesi uppskotini eru skrivaði inn í uppskot til broyting í reglugerðini fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, j.nr. 23/01820-2

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr 9 frá 5. Mars 1970 skráseting av skipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.
Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, frá 1. November 2022.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.Nr. 23/01820-2 : Uppskot til broyting í reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnarmeistari mælir til at taka undir við uppskoti til broytingar í reglugerðini fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, j.nr. 23/01820-2, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

# 115/23 Framflytingar fyri roknskaparárið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 127/23 | 23/01899-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 115/23 | 23/01899-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 23/01899-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtat sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2022 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2022.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 20,4 mió. kr. netto og fyri íløgur 200,5 mió. kr og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 5,6 mió | 133,4 mió |
| TH | 14,8 mió | 67,1 mió |
| **Íalt** | **20,4 mió** | **200,5 mió** |

Samlaða minninýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er 5,6 mió. kr. Á § 1,2.3,5 er talan um minninýtslu, imeðan tað á § 4,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjali 23/01899-4

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>27. april 2023 | Blað nr.: 435<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| Ymiskar | | Framflutt 2022 | Ymiskar | | Játtan 2023 | | 220,9 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin og virkandi fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á 20,4 mió. kr. netto til rakstur og 200,5 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 23/01889-4

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>27. april 2023 | Blað nr.: 436<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 116/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 129/23 | 23/00151-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 116/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 17:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Súsanna Olsen | |